# Frágreiðing um brúkaraprístalið

**Hagstova Føroya**
**2002**

Hagstova Føroya
Traðagøta 39
Postboks 2068
FO-165 Argir

Telefon 35 28 00
Telefax 35 28 01
T-postur: hagstova@hagstova.fo
Heimasíða: www.hagstova.fo

© 2002 Hagstova Føroya

| | |
|---|---|
| Innihald: | Hagstova Føroya |
| Málslig vegleiðing: | Jóhan Hendrik W. Poulsen |
| Umbróting: | Hagstova Føroya |
| Permumynd: | Stephanssonshús |
| Prent: | Bookpartner |
| Útgáva: | Hagstova Føroya,<br>Tórshavn 2002 |

ISBN 99918-952-1-3

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ..... **5**
Endamálið við prístali ..... 6
Nýtsluendamálið við undanfarna brúkaraprístali ..... 6
Hvat mátar nýggja brúkaraprístalið? ..... 8
Brúkaraprístal og inflasjón ..... 9
Onnur nýtsla av brúkaraprístali ..... 9
Yvirlit yvir kapitlini í frágreiðingini ..... 9
**1. partur Húsarhaldsnýtsla og útrokning av brúkaraprístali** ..... **11**
1. kap. Avmarking av húsarhaldsnýtsluni ..... 11
1.1 Virðið á húsarhaldsnýtsluni ..... 11
1.2 Húsarhaldsnýtsla/einstaklingsnýtsla ..... 11
1.3 Landafrøðilig avmarking ..... 11
1.4 Vørur og tænastur til vinnuendamál ..... 12
1.5 Egin framleiðsla ..... 12
1.6 Endurnýtsla ..... 12
2. kap. Flokking av húsarhaldsnýtsluni ..... 13
2.1 Altjóða nummarskrá eftir nýtsluendamáli ..... 13
2.2 Nýtslan skipað í grundbólkar ..... 13
3. kap. Bygnaðurin í brúkaraprístalinum ..... 15
3.1 Meginreglur fyri skipan av grundbólkum ..... 16
3.2 Frá handilsprísum til endaligt prístal ..... 16
3.3 Grundbólkaprísir ..... 17
3.4 Grundbólkaprístal ..... 22
3.5 Brúkaraprístal og bólkaprístal ..... 22
4. kap. Prístøka ..... 23
4.1 Stakroyndin ..... 23
4.2 Val av veitarum ..... 23
4.3 Val av umboðsvørum og -tænastum ..... 26
**2. partur Kanningin av húsarhaldsnýtsluni** ..... **27**
5. kap. Kanningarháttur ..... 27
5.1 Keldur ..... 27
5.2 Tilfeingi og nýtsla ..... 28
6. kap. Innfluttar vørur ..... 29
6.1 Vøruskráin ..... 29
6.2 Innflytarar ..... 29
6.3 Sølan hjá innflytarum ..... 30
6.4 Innflutningur til húsarhald ..... 31
6.5 Søluprísur ..... 31
6.6 Aðrar húsarhaldsvørur ..... 32
Kap. 7 Føroysk framleiðsla ..... 33
7.1 Keldur og háttalag ..... 33
7.2 Vøruframleiðsla ..... 34
7.3 Tænastur ..... 35
8. kap. Býli ..... 39
8.1 Íbúðanýtslan í leiguíbúðum ..... 40
8.2 Prísgongdin fyri húsaleigu ..... 41
8.3 Íbúðanýtslan í ognaríbúðum ..... 41
8.4 Prísgongdin fyri ognaríbúðir ..... 43
Skjal 1 Útrokning av miðalprísum, grundbólkaprístali og brúkaraprístali ..... 44
Skjal 2 Spurnakanning um býlisútreiðslur ..... 46
Skjal 3 Úrslit av húsarhaldskanningini ..... 47

# Inngangur

Eftir sáttmálasamráðingarnar í 1999, tá ið ósemja um veruliga prísvøksturin í Føroyum tók seg upp millum partarnar, gjørdist alment kunnugt, at neyðugt var við einum meira álítandi brúkaraprístali. Landsstýrið samtykti, at nýtt vektargrundarlag til brúkaraprístalið skuldi gerast, og var hetta arbeiði liðugt á vári 2001.

1. juli 2001 var brúkaraprístalið roknað fyrstu ferð eftir nýggja vektargrundarlagnum, sum byggir á kanning av nýtslumynstrinum hjá húsarhaldunum í 1998. Seinast vektirnar vórðu dagførdar, var í 1975, og leingi hevur verið greitt, at vøru- og tænastuumboðanin og nýtslumynstrið í vektargrundarlagnum samsvaraði ikki við veruligu samansetingina av húsarhaldsnýtsluni í dag, eina fjórðingsøld seinni.

Vektargrundarlagið frá 1975 var grundað á húsarhaldskanning í 1971-72 av nýtslumynstrinum hjá 47 løntakarahúsarhaldum við 2-8 børnum.

Nýggja vektargrundarlagið er ikki funnið við spurnakanning hjá húsarhaldum um nýtslu teirra. Í staðin er nýtslumynstrið kannað um skráir, serliga innflutnings- og mvg-skránna, og við spurningum til innflytarar og veitarar um býtið av sølu teirra til ávikavist smásølu/húsarhald og vinnu, stovnar og onnur. Serstøk spurnakanning er gjørd fyri býlisútreiðslur. Eisini eru upplýsingar um nýtslumynstrið hjá húsarhaldum í Íslandi og Danmark nýttar í ávísum førum.

Nýggja vektargrundarlagið er flokkað eftir altjóða nummarskrá, soleiðis at prísgongdin í Føroyum gerst meiri sambærilig við prísgongdina í øðrum londum.

Úrvalið av vørum og tænastum, sum prísir verða tiknir fyri at umboða húsarhaldsnýtsluna, er gjørt av nýggjum, eins og útrokningarhátturin av miðalprísum er broyttur.

Eisini er nýggj umfatandi telduskipan gjørd til at rokna brúkaraprístalið.

At keldurnar til nýggja vektargrundarlagið eru skráir og veitarar merkir, at vit ikki hava eitt útgreinað nýtslumynstur frá upprunakelduni, húsarhaldinum sjálvum.

Í staðin finna vit útreiðslurnar hjá øllum húsarhaldum sundurgreinaðar í vørubólkar og tænastur, sum veitarakeldurnar geva møguleika til.

Samanborið við spurnakanning hjá húsarhaldum eru tó fleiri avmarkingar við kanningini.

Í fyrsta lagi verður nýtslan ikki so væl sundurgreinað á vørubólkar og tænastur, tá upplýsingarnar ikki stava beinleiðis frá húsarhaldunum. Eitt nú kundu tænastuveitingar verið nógv betur lýstar við spurnakanning.

Í øðrum lagi gevur kanningin, umframt vektargrundarlagið til brúkaraprístalið, ikki aðra stórvegis vitan enn nýtsluútreiðslurnar hjá húsarhaldunum samanlagt.

Uttan spurnakanning ber ikki til at gera nýtslumynstrið upp eftir ymiskum undirstøðiseyðkennum fyri húsarhaldini, so sum sosialum, samfelagsfrøðiligum og íbúgvafrøðiligum viðurskiftum. T.d. uppgerð av nýtslumynstrinum eftir inntøku hjá húsarhaldinum, eftir slag og stødd av húsarhaldi, barnafamiljum, tali á børnum, eftir aldri á stakbúgvandi, eftir búsetu o.s.fr.

Hinvegin eru eisini avmarkingar við spurnakanningum í húsarhaldinum, samanborið við kanning um skráir og fyrispurningar hjá veitarum. Ein er, at húsarhaldini kunnu leggja seg eftir at keypa við betri skili, meðan kanningin stendur við, enn tey annars gera, so at myndin av dagligu nýtsluni verður órógvað. Lyndi kann eisini vera til at krógva viðkvæmar upplýsingar um t.d. rúsdrekka- og tubbaksnýtslu. Upplýsingar um nýtsluna hjá børnum og tannáringum uttan fyri heimið er eisini trupult at fáa hendur á við spurnakanning.

Uttan mun til hvør av kanningarháttunum varð valdur, so fingu vit eitt nýtt vektargrundarlag, sum samsvaraði munandi betur við veruliga nýtslumynstrið í dag enn undanfarna vektargrundarlag. Og harvið eitt meiri álítandi

brúkarapríštal. Og var hetta eisini høvuðsendamálið við at gera kanningina.

## Endamálið við prístali

Endamálið við einum prístali er at máta prísbroytingar. Prístal er eitt útroknað tal, sum sýnir gongdina í príslegu ávíst tíðarskeið.
Henda frágreiðing snýr seg um brúkaraprístal, sum í Føroyum vanliga, og heldur misvísandi, bara hevur verið kallað prístalið.
Brúkaraprístal er ein samanfating av, hvussu prísirnir á einari ávísari nýtslusamanseting av vørum og tænastum, sum húsarhaldið keypir, eru broyttir frá einum tíðarskeiði til annað.
Prísirnir á ymiskum vørum og tænastum broytast ikki eins, so eitt prístal kann bara endurspegla miðalprísbroytingarnar. Virðið á einum prístali verður eitt grundtíðarskeið sett til 100, og virðið á prístalinum onnur tíðarskeið vísir miðal prosentvísu prísbroytingina samanborna við grundtíðarskeiðið.

Hetta setir beinanvegin tveir grundleggjandi spurningar:

Hvørjar vørur og tænastur, hvørjar prísir, skal prístalið umfata?

Hvør háttur er tann rættasti at finna miðalprísbroytingina fyri virðið á teimum valdu vørunum og tænastunum frá einum tíðarskeiði til annað?

Hesin seinni spurningurin verður viðgjørdur gjøgnum alla frágreiðingina. Tað er serliga fyrra spurningin, sum nomið skal verða við her. Tí alt eftir hvussu hann verður svaraður, fáa vit eitt ávíst prístal. Úrvalið av vørum og tænastum sum prístalið skal fevna um, ger av slagið av prístali. T.d. prístal fyri húsarhaldsnýtslu, brúkaraprístal, útflutningsprístal, innflutningsprístal. Tað finst eitt ótal av prístølum. Hvussu eitt prístal verður skilmarkað, og hvat tað skal umfata, veldst mest um, hvat endamál tað skal brúkast til.
Brúkaraprístalið er ætlað at máta miðalprísbroytingar fyri vørur og tænastur, sum húsarhaldið keypir, t.e. eitt prístal fyri húsarhaldsnýtsluna. Nú eru húsarhald ikki eins, og vit keypa ikki sama slag ella somu nøgdir av vørum og tænastum eitt ávíst tíðarskeið. Ymisk brúkaraprístøl kunnu tí roknast, alt eftir hvørji húsarhald og hvørjar vørur og tænastur tað fevnir um.
Eitt brúkaraprístal fyri nýtslumynstrið hjá láginntøkuhúsarhaldum kann vísa heilt øðrvísi prísgongd enn eitt brúkaraprístal fyri nýtslumynstrið hjá háinntøkuhúsarhaldum, júst tí nýtslumynstrið er ymiskt - húsarhald við minni inntøku at ráða yvir nýta lutfalsliga størri part av henni til neyðsynjarvørur.
Slík brúkaraprístøl eftir húsarhaldsinntøku ber væl til at gera, um nýtslumynstrið verður funnið við húsarhaldskanning, har eisini verður spurt um inntøkuna hjá húsarhaldunum.
Eisini ber til at útihýsa ávísum vørum og tænastum, t.d. marglætisvørum, sum eru ov kostnaðarmiklar hjá flestum húsarhaldum at útvega sær.

## Nýtsluendamálið við undanfarna brúkaraprístali

Sum høvuðsreglu eigur nýtsluendamálið við einum brúkaraprístali at gera av, hvørji húsarhald og hvørjar vørur og tænastur, tað skal fevna um.
Prístalið frá 1975 var eitt serstakt brúkaraprístal, sum bygdi á nýtslumynstrið í 1971-72 hjá løntakarahúsarhaldum við 2-8 børnum, og endurspeglaði soleiðis miðalprísgongdina fyri nýtsluna hjá einum løntakara-barnahúski.
Tað var eisini upprunaliga ætlað at prístalsjavna lønirnar, har serliga húskjum við børnum skuldi tryggjast viðbót fyri dýrtíð: keypiorkan til ta nýtslu, sum var vanlig fyri júst hetta løntakara-barnahúskið, skuldi varðveitast. Vektargrundarlagið, t.e. lutfalsliga nýtslan eftir vøru- og tænastubólkum, fevndi tí serstakliga um matvørur, klædnavørur, gerandisvørur og tænastur annars.
Á talvu 1 niðanfyri er samanbering av undanfarna og nýggja vektargrundarlagnum eftir høvuðsbólkum.

**Talva 1. Samanbering av vektargrundarlagnum 1972 og 1998**

| **Coicop-nr.** | **Høvuðsbólkar** | **1972** | **1998** |
|---|---|---|---|
| 01 | Matur og drekka | 42,1 | 21,3 |
| 02 | Rúsdrekka og tubbak | 5,6 | 5,9 |
| 03 | Klædnavørur og fótbúnaður | 10,2 | 5,4 |
| 04 | Býli | 21,5 | 20,2 |
| 05 | Innbúgv, húsbúnaður o.l. | 8,2 | 6,0 |
| 06 | Heilsa | 1,6 | 2,8 |
| 07 | Flutningur | 3,2 | 13,1 |
| 08 | Samskifti | 1,0 | 4,6 |
| 09 | Frítíð og mentan | 1,9 | 11,9 |
| 10 | Útbúgving | - | 0,1 |
| 11 | Hotell og matveitarar | - | 3,6 |
| 12 | Ymiskar vørur og tænastur | 4,7 | 5,3 |
| **Allir høvuðsbólkar samanlagt** | | **100,0** | **100,0** |

Talvan skal lesast soleiðis, at t.d. matvøruparturin í vektargrundarlagnum eftir kanningini í 1972 var 42,1 %, meðan nýggja kanningin vísir, at hesin parturin nú er 21,3 %.
Talvan vísir eisini, at heilt nógvar vørur og tænastur í nýggja vektargrundarlagnum antin ikki vóru útbodnar í 1972 ella vóru ikki eftirspurdar av teimum 47 húskjunum í kanningini tá.
T.d. var nýtslan í bólkunum 07 flutningur, 08 samskifti og 09 frítíð og mentan í vektargrundarlagnum frá 1972 samanlagt góð 6 %, men í nýggja vektargrundarlagnum úti við 30 %.

Talva 2 vísir, at nýtslan hjá føroysku húsarhaldunum í 1998 var stívliga 3,2 mill. kr. samanlagt og 288.000 kr. hjá miðalhúski. Talvan vísir eisini, hvussu nógv húsarhaldini keyptu fyri av úrvaldum stórum nýtslubólkum samanlagt og í miðal.

**Talva 2. Húsarhaldsnýtsla í kr. í úrvaldum vørubólkum, samanlagt og fyri miðalhúski**

| **Coicop-nr.** | **Vørubólkar** | **Samanlagt** | **Miðalhúski** |
|---|---|---|---|
| 01.1.1 | Breyð og kornvørur | 117.439.134 | 8.287 |
| 01.1.2 | Kjøt | 121.355.104 | 8.563 |
| 01.1.4 | Mjólk, ostur og egg | 98.553.753 | 6.954 |
| 01.1.8 | Sukur, sjokoláta, góðgæti o.l | 94.666.187 | 6.680 |
| 04.1 | Húsaleiga | 60.335.510 | 4.257 |
| 04.2 | Sethús, rentuútreiðslur | 254.993.750 | 17.993 |
| 04.3 | Viðlíkahald av bústaði | 89.138.675 | 6.290 |
| 04.5 | Ravmagn og hiti | 248.247.519 | 17.517 |
| 07.1 | Akfarskeyp | 165.659.554 | 11.689 |
| 07.2 | Rakstur av akførum | 202.797.774 | 14.310 |
| 08.3 | Teletænastur | 131.184.191 | 9.257 |
| 09.1 | Út- og sjónvarp, myndatól, KT-útgerð o.l. | 84.703.705 | 5.977 |
| 09.5 | Bløð. bøkur og skrivitilfar | 108.636.328 | 7.666 |
| 09.6 | Frítíðarferð uttanlands | 78.376.540 | 5.530 |
| 01.1.1 | Breyð og kornvørur | 117.439.134 | 8.287 |
| **Øll húsarhaldsnýtsla** | | **3.232.450.653** | **228.087** |

**Hvat mátar nýggja brúkaraprístalið?**

Nýggja brúkaraprístalið vísir prísgongdina fyri nýtsluna hjá øllum húsarhaldum í Føroyum. Vektargrundarlagið er samansetingin av allari húsarhaldsnýtsluni. Hetta merkir, at húsarhald hava ávirkan á vektirnar í vektargrundarlagnum eftir egnu nýtslu síni. T.d. hava húsarhald við nýtslu av einum ávísum vørubólki ella tænastu, ið er yvir miðal, eina ávirkan á vektina fyri henda bólk, sum er yvir miðal, o.s.fr. Henda vekting av húsarhalds-nýtsluni kallast "plutokratisk". Við hesari vekting mátar brúkaraprístal miðalprísbroytingar fyri miðalnýtsluvirði.
Við sokallaðari "demokratiskari" vekting harafturímóti fáa øll húsarhald eins stóran týdning fyri vektirnar. Hesin týdningur er teirra egna nýtsla av einari vøru sum lutfall av teirra egnu nýtslu samanlagt. Eitt brúkaraprístal við demokratiskari vekting mátar, hvussu prísbroytingar ávirka miðalhúsarhaldið, heldur enn hvussu tær ávirka miðalnýtsluna, soleiðis sum brúkaraprístal við plutokratiskari vekting. Talva 3 vísir dømi um hesi bæði sløg av vekting.

Í døminum eru matvørur 25 % av nýtsluni hjá húsarhaldi 1 og 15 % hjá húsarhaldi 2. Miðal av hesum er 20 %, sum svarar til demokratiska vekting. Bæði húsarhaldini hava eins stóran týdning fyri vektina.
Eftir plutokratiskari vekting verður vektin fyri matvørur 18 %. Matvøruparturin tilsamans verður her roknaður av allari nýtsluni tilsamans, og nýtslan hjá húsarhaldi 2 til aðrar vørur er so mikið stór, at hon dregur matvørupartin samanlagt av nýtsluni samanlagt niður móti húsarhaldsins egna matvøruparti.

**Talva 3. Dømi um "plutokratiska" og "demokratiska"vekting**

**Tvey húsarhald og Tveir vørubólkar**

**Nýtsla í kr.**

| Húsarhald / Vørur | **Húsarhald 1** | **Húsarhald 2** | **Húsarhald Samanlagt** |
|---|---|---|---|
| **Matvørur** | 25 | 30 | 55 |
| **Aðrar vørur** | 75 | 170 | 245 |
| **Vørur samanlagt** | 100 | 200 | 300 |

Nýtsluparturin av matvørum fyri hesi bæði húsarhaldini er:

Húsarhald 1: 25 kr./100 kr. = 0,25
Húsarhald 2: 30 kr./200 kr. = 0,15

**Plutokratisk vekt** fyri matvørur er matvøruparturin av nýtsluni samanlagdari:

$$\frac{(25+30)}{(25+75)+(30+170)} = \frac{55}{300} = 0{,}18$$

**Demokratisk vekt** fyri matvørur er miðal av lutfalsliga matvørupartinum hjá báðum húsarhaldunum samanløgdum

$$\frac{1}{2}\left(\frac{25}{25+75}+\frac{30}{30+170}\right) = \frac{1}{2}\left(\frac{25}{100}+\frac{30}{200}\right) = 0{,}20$$

Vektargrundarlagið undir nýggja brúkaraprístalinum er funnið út frá húsarhaldsnýtsluni samanlagdari, og svarar hetta tí til plutokratiska vekting, sum eisini er vanlig at nýta í brúkaraprístali. Fyri at kunna nýta demokratiska vekting er neyðugt at vita nýtslumynstrið hjá húsarhaldum eftir ávísum eyðkennum, til dømis eftir inntøkum hjá húsarhaldum, eftir stødd á húsarhaldi ella bústaðarmynstri. Serstøk brúkaraprístøl kunnu so roknast fyri ymiskar húsarhaldsbólkar. Men til hetta endamál krevst sjálvsagt víðfevnd húsarhaldskanning, sum ikki er gjørd til nýggja brúkaraprístalið.

Ein fyrimunur við plutokratiskari vekting er, at eingin er at gera ov lítið av rúsdrekka- ella tubbaksnýtslu, og nýtslan hjá børnum og tannáringum uttan fyri heimið verður eisini fangað.

## Brúkaraprístal og inflasjón

At hava tamarhald á heildarinflasjónini er vanliga eitt høvuðsmál í búskaparpolitikki. Men tað er greitt, at brúkaraprístal er ikki eitt mát fyri heildarinflasjónina, tí tað mátar bara prísbroytingar á nýtsluvørum og tænastum, sum húsarhaldini keypa. Tað fevnir ikki um t.d. íløguvørur og tilfarsnýtslu hjá vinnuni ella almenna nýtslu.
Kortini verður brúkaraprístalið ofta tulkað sum eitt heildarmát fyri inflasjónina, bæði av politikarum, tjóðarbankum og eisini av fjølmiðlum og almenninginum. Og ikki uttan grund. Tí hóast brúkaraprístalið ikki er eitt mát fyri heildarinflasjónina, so kann roknast við, at gongdin í brúkaraprístalinum samsvarar rættiliga væl við heildargongdina. Og serstakliga kann roknast við, at brúkaraprístalið er ein gott mát fyri, um inflasjónin er vaksandi ella minkandi, og eisini fyri umskifti í inflasjónsgongdini.

## Onnur nýtsla av brúkaraprístali

- Búskaparligar greiningar
  - t.d. inflasjón samanborin við onnur lond - ávirkan á kappingarføri
- Stilling - almennar pensiónir, lestrarstuðul, tryggingargjøld o.l.
- Deflatering av tjóðarroknskapi og øðrum búskaparligum støddum, t.d. smásøluumsetningi - t.e. at finna veruligu gongdina, reinsaða fyri prísávirkan.
- Útrokning av keypsorkuni

## Yvirlit yvir kapitlini í frágreiðingini

Frágreiðingin er býtt í tveir høvuðspartar. **1. partur** snýr seg um, hvat prístal er, um bygnaðin í brúkaraprístalinum, um prístøku og útrokning av prístali.

Sum tað skilst av innganginum, so eru nógvar avgerðir, ið skulu verða tiknar, tá ið eitt prístal skal evnast til. Avgerð um endamálið við prístalinum, um hvørji húsarhald og hvørjar vørur og tænastur, tað skal fevna um. Prís- og útreiðsluhugtakið skal skilmarkast. Vøru- og tænastubólkar skulu veljast út og skipast í eitt vektargrundarlag. Ein stakroynd av veitarum og umboðsvørum og -tænastum skal veljast, sum prísir verða tiknir fyri at umboða prísgongd í nýtslubólkunum.

Í **1. kap**. verður húsarhaldsnýtslan lýst og avmarkað landafrøðiliga, frá einstaklingsnýtslu samanlagari og frá vinnuligari nýtslu.

Í arbeiðinum við nýggja brúkaraprístalinum hevur dentur verið lagdur á, at tað er sambæriligt við brúkaraprístøl í londunum kring okkum. Húsarhaldsnýtslan er tí flokkað í nýtslubólkar eftir altjóða nummarskrá. Og hon er skipað í so smáar bólkar - grundbólkar - sum heimildir hava gjørt tað møguligt, har hvør grundbólkur fær sína nýtsluvekt eftir lutfalsliga týdningi sínum av húsarhaldsútreiðslunum samanløgdum í 1998. Húsarhaldsnýtslan soleiðis skipað í bólkar við nýtsluvekt, er vektargrundarlagið, ella prístalsgrundarlagið. Um flokking av húsarhaldsnýtsluni og um vektir er **2. kap.**

**3. kap.** er eitt yvirlit yvir bygnaðin og meginreglurnar fyri útrokningini í tí føroyska brúkaraprístalinum. Um skipan av grundbólkum og val av eindarvørum og -tænastum at umboða nýtsluna í grundbólkum.

Húsarhaldsnýtslan fevnir um eitt ótal av vørum og tænastum og uppaftur fleirfalt tal av prísum frá hundraðtals veitarum. “Prístalsvandamálið” er útfrá prís- og mongdarbroytingum á hesari ørgynnu av vørum og tænastum at skilja prísbroytingarnar burturúr og lýsa tær í einum tali - miðalprísbroytingina fyri vørurnar og tænasturnar samanlagdar frá einum tíðarskeiði til annað.

Meðan 1. kap. viðger avmarkingina av vørum og tænastum í húsarhaldsnýtsluni, og 3. kap. val av eindarvørum og -tænastum, so er **4. kap.** um val av vøru- og tænastuskapi, sum prísir skulu takast fyri og val av veitarum, har sum prísir skulu útvegast.

Í skjali 1 er eitt yvirlit yvir formlar til útrokning av miðalprísum og brúkaraprístali.

**2. partur** er um kanning av húsarhaldsnýtsluni í Føroyum. Úrslitið av hesari kanning er nýtslumynstrið hjá føroyska húsarhaldinum, sum gevur okkum vektargrundarlagið til útrokningar av brúkaraprístalinum.

Fyri allarflestar húsarhaldsvørur er galdandi, at tær eru eisini tilfarsnýtsla í vinnuni ella almenn nýtslu. Eisini eru mangar tænastur, sum bæði eru húsarhaldsnýtsla og nýtsla hjá øðrum.

Endamálið við kanningini er at finna, hvussu stórur partur av øllum vørum og tænastum útboðin í Føroyum endar í húsarhaldinum sum nýtsla, og at flokka hesa nýtslu eftir altjóða nummarskránni COICOP (sí seinni) til eitt vektargrundarlag.

**5. kap.** er um kanningarháttin alment, og hvørjar keldur eru nýttar til at skilja húsarhaldsnýtsluna frá aðrari nýtslu.
Kanningin tekur støði í tí, at øll nýtsla í Føroyum hevur sín uppruna í tilfeinginum av innflutningi og føroyskari framleiðslu. Meginparturin av húsarhaldsvørum í Føroyum kemur uttanífrá, meðan tænastunýtslan hjá húsarhaldunum í mestan mun stavar frá føroyskum veitarum.

Kanningin er eftir hesum býtt í tveir høvuðspartar. **6. kap.** er um, hvussu húsarhaldsparturin er funnin úr innfluttu vørunum, og **7. kap.** er um, hvussu stórur partur av føroyskari vøru- og tænastuframleiðslu endar sum húsarhaldsnýtsla.

**8. kap.** er um býli. Ein spurnakanning varð gjørd um býlisútreiðslur og leigumarknaðin, evnini í hesari spurnakanning eru á skjali 2.

Úrslit av kanningini av húsarhaldsnýtsluni í Føroyum verða løgd fram í skjali 3.

# 1. partur Húsarhaldsnýtsla og útrokning av brúkarapRístali

## 1. kap. Avmarking av húsarhaldsnýtsluni

Í flestum londum byggir vektargrundarlagið í brúkaraprístalinum - umframt uppgerð av einstaklingsnýtsluni í tjóðarroknskapinum - á umfatandi húsarhaldskanningar av nýtslu-mynstrinum við jøvnum millumbilum. Á tann hátt kann vektargrundarlagið finnast á sera útgreinaðum vøru- og tænastubólkum, sum prísir mánaðarliga vera útvegaðir fyri. Undanfarna prístal í Føroyum var eisini grundað á eina húsarhaldskanning, um enn bara 47 húsarhald vóru við í teirri stakroyndini.

Sum nevnt er eingin stakroynd gjørd av húsarhaldsnýtsluni til nýggja brúkaraprístalið, og tí hava vit ikki eitt útgreint nýtslumynstur frá upprunakelduni, húsarhaldinum sjálvum. Heldur ikki hava vit samband millum nýtslu og inntøku frá brúkaranum sjálvum.

Í staðin er kanning gjørd av húsarhaldsnýtsluni í Føroyum samanlagt, býtt á so útgreinaðar vørubólkar og tænastur sum keldurnar hava loyvt. Henda kanning hevur sostatt rokkið tveimum málum í senn:

1. Útreiðslurnar til nýtslu hjá øllum húsarhaldum í Føroyum
2. Vektargrundarlag fyri brúkaraprístal

Hesin háttur at finna fram til vektargrundar-lagið út frá húsarhaldsnýtsluni samanlagdari kann "verjast" út frá endamálinum við nýggja føroyska brúkaraprístalinum. Meðan undanfarna prístalið upprunaliga var ætlað at prístalsjavna lønirnar hjá løntakara-barna-familjum, so skal nýggja brúkaraprístalið fyrst og fremst vísa prísgongdina fyri vørur og tænastur hjá húsarhaldunum í Føroyum sum heild.

### 1.1 Virðið á húsarhaldsnýtsluni

Virðið á húsarhaldsnýtsluni - húsarhalds-útreiðslan - verður roknað sum samløgan av prísi faldað við mongd fyri allar vørur og tænastur, sum húsarhaldini keypa eitt ávíst tíðarskeið. Í nýggja brúkaraprístalinum er hetta tíðarskeið 1998.

Hetta virðið á húsarhaldsnýtsluni verður gjørt upp í søluprísum, t.e. uppgerðin av húsarhalds-nýtsluni byggir á teir prísir, sum húsarhaldini í roynd og veru skulu gjalda fyri tær vørur og tænastur, sum nýtslan fevnir um. Óbeinleiðis skattir, ið kunnu knýtast at vørum og tænastum, sum húsarhaldið kann velja at nýta ella lata vera, verða roknaðir við sum útreiðslur til húsarhaldsnýtslu. Teir eru meir-virðisgjald og aðrir vøru- og tænastuskattir.

### 1.2 Húsarhaldsnýtsla/einstaklingsnýtsla

Vektargrundarlagið undir brúkaraprístalinum fevnir um allar útreiðslur av vørum og tænastum, sum húsarhaldini hava at nøkta sín tørv og síni ynski, og sum hava ein prís, sum húsarhaldini gjalda.

Tað er sostatt ikki øll einstaklingsnýtsla, sum verður roknað við í vektargrundarlagið. Nýtsla, sum húsarhaldið ikki hevur útreiðslur av beinleiðis, verður hildin uttanfyri. Her verður serliga hugsað um vørur og tænastur veittar av feløgum, ella nýtsla, sum verður goldin - ella endurgoldin - av tí almenna, og tí ikki hevur ein beinleiðis prís. Fyri barnaansing til dømis er foreldraparturin av ansingar-gjaldinum tikin við í vektargrundarlagið, men ikki parturin, sum er goldin av landi og kommunum um skattin. Í uppgerðini av einstaklingsnýtsluni í tjóðarroknskapinum er henda nýtsla sjálvsagt við, men ikki í brúkara-prístalinum, sum jú er eitt mát fyri prís-broytingum.

### 1.3 Landafrøðilig avmarking

Húsarhaldsnýtslan í nýggja brúkaraprístalinum fevnir um nýtsluna hjá bæði føroyskum og útlendskum húsarhaldum í Føroyum. Tað er henda nýtsla samanlagt, sum tað hagfrøðiliga er møguligt at flokka eftir nýtsluendamáli og koma fram til eitt vektargrundarlag. Og tað er eisini øll húsarhaldsnýtsla í Føroyum - eisini útlendsk - sum ávirkar prísgongdina.

Harafturímóti er nýtslan hjá føroyskum húsarhaldum uttanlands ikki roknað við í vektargrundarlagið. Ferðaútreiðslurnar í sambandi við frítíð og ørindi hjá føroyskum húsarhaldum uttanlands verða tó roknaðar við í húsarhaldsnýtsluna.

Hesin munur á uppgerðini av húsarhaldsnýtsluni í vektargrundarlagnum og uppgerðini av einstaklingsnýtsluni samanlagdari er sostatt:

| | |
|---|---|
| | Einstaklingsnýtsla samanløgd |
| - | Nýtsluútr. veittar av tí almenna og feløgum |
| = | húsarhaldsnýtsla hjá búsettum í Føroyum samanlagt |
| - | keyp føroyinga í útlondum |
| + | keyp útlendinga í Føroyum |
| = | **Húsarhaldsnýtsla í Føroyum** |

Húsarhaldsnýtslan í Føroyum fevnir um keyp føroyinga og útlendinga av vørum og tænastum í Føroyum, men ikki keyp føroyinga í útlondum.
Einstaklingsnýtslan í tjóðarroknskapinum fevnir um - umframt húsarhaldsnýtsluna í Føroyum - vørur og tænastur, veittar av felagsskapum, veitingar til nýtslu frá tí almenna og haraftrat keyp føroyinga í útlondum, men ikki keyp útlendinga í Føroyum.

## 1.4 Vørur og tænastur til vinnuendamál

Vørur og tænastur kunnu eyðmerkjast eftir sínum nýtsluendamáli. Til dømis matvørur, klædnavørur, býli o.s.fr. Og málið við kanningini av húsarhaldsnýtsluni - lýst í 2. parti - er at gera upp allar tær útreiðslur til vørur og tænastur, sum húsarhaldini útvega sær, nýta ella rinda fyri, og sum ikki eru til vinnuendamál og íløgur.
Trupulleikin her er, at summar av vørunum og tænastunum, sum húsarhaldið keypir, kunnu antin verða til egna nýtslu ella til vinnulig endamál, til dømis bensin, klæði og flutningur. Eisini vinnufyritøkur keypa nógvar vørur og tænastur at nýta sum rávørur í framleiðslu teirra, men hesar kunnu eisini vera húsarhaldsnýtsla, til dømis olja, mjøl o.s.fr. Tann parturin av hesum blandaðu vørum og tænastum, sum eru til vinnuendamál, er ikki at rokna upp í húsarhaldsnýtsluna.

- Íløguvørur og parturin av vørum og tænastum, sum er tilfarsnýtsla í framleiðslu, skulu ikki takast við í vektargrundarlagið.
- Samansparing, lívstrygging og eftirlønartrygging og fíggjaríløgur skulu ikki roknast við.
- Serlig fyrilit skulu takast fyri býli og møguliga eisini ávísar drúgvar nýtsluvørur, har útvegan, nýtsla og gjalding ikki nýtast at vera samstundis.

## 1.5 Egin framleiðsla

Nýtsla av egnari framleiðslu verður ikki roknað við í húsarhaldsnýtsluna í prístalinum. T.d. verða epli úr egnari veltu ikki roknað við, meðan handilstøðini, sum verða keypt, skulu roknast við. Nýtsla av egnari framleiðslu verður sjálvsagt roknað við í einstaklingsnýtsluna í tjóðarroknskapinum.

## 1.6 Endurnýtsla

Søla av brúktum vørum er ikki tikin við í húsarhaldsnýtsluna. Hesin marknaður er torførur og tíðarkrevjandi at gera upp. Hann er eisini mettur at vera sera lítil samanborin við húsarhaldsnýtsluna samanlagt. Serstakliga tá ið hugsað verður um, at søla frá einum húsarhaldi til annað skal ikki roknast upp í húsarhaldsnýtsluna, tí nýtslan hjá húsarhaldsseljara minkar samsvarandi, sum nýtslan hjá húsarhaldskeypara veksur. Og sølan av brúktum vørum til húsarhaldsgeira frá geirum uttan fyri húsarhaldið er ikki stór. Til dømis søla av brúktum bilum um bilasølur - tá er tað bara vinningurin hjá bilasølum, sum er viðskifti við annan geira.

# 2. kap. Flokking av húsarhaldsnýtsluni

Húsarhaldsnýtslan er í nummarskrá sundurgreinað í nýtslubólkar í fimm stigum. Mest greinaðu nýtslubólkarnir eru grundbólkarnir, sum eru vektargrundarlagið undir brúkaraprístalinum, og vektin í hvørjum grundbólki umboðar útreiðslurnar fyri allar vørurnar ella tænasturnar í grundbólkinum og ikki bara ta vøruna ella tænastuna, sum prísir verða tiknir fyri.
Hvør vøra og hvør tænasta í vektargrundarlagnum skal vera í einum og bara einum grundbólki.

## 2.1 Altjóða nummarskrá eftir nýtsluendamáli

Fyri at kunna samanbera prísgongdina í Føroyum við hina útlendsku er húsarhaldsnýtslan flokkað eftir altjóða nummarskránni COICOP (**C**lassification **o**f **I**ndividual **Co**nsumption by **P**urpose), flokking av einstaklingsnýtslu eftir endamáli. Hetta er eisini nummarskráin, sum einstaklingsnýtslan í tjóðarroknskapi verður flokkað eftir.

**COICOP á 1. stigi er greinað í 12 høvuðsbólkar:**

01 Matur og drekka
02 Rúsdrekka og tubbak
03 Klædnavørur og fótbúnaður
04 Býli
05 Innbúgv, húsbúnaður o.l.
06 Heilsa
07 Flutningur
08 Samskifti
09 Frítíð og mentan
10 Útbúgving
11 Hotell og matveitarar
12 Ymiskar vørur og tænastur

Hvør av hesum høvuðsbólkum er í COICOP-nummarskránni skipaður í smærri bólkar á øðrum og triðja stigi, sum víst á mynd 2.1. Uppaftur smærru nýtslubólkarnar á fjórða og fimta stigi hevur Hagstovan sundurgreinað, fyri at vektirnar í vektargrundalagnum verða fyri so smáar nýtslubólkar, sum keldurnar til nýtslumynstrið loyva. Á fimta og niðasta stigi er húsarhaldsnýtslan samansett av 300 grundbólkum.

## 2.2 Nýtslan skipað í grundbólkar

Meðan COICOP-nummarskráin greinir vørurnar og tænasturnar eftir nýtsluendamáli úr erva í fleiri og smærri bólkar, t.e. frá øllum húsarhaldsvørum og -tænastum samanløgdum niðureftir á 1. stig, 2. stig o.s.fr., so eru nýtsluútreiðslurnar funnar á botninum - t.e. fyri teir 300 grundbólkarnar - og eru so samanlagdar uppeftir nummarskránni í størri og tyngri bólkar fyri hvørt stigi.
Úrslitið er, at tá ið útreiðslan fyri tann seinasta grundbólkin er funnin, so er eisini samanlagda húsarhaldsnýtslan funnin. Og tástani kunnu eisini vektirnar fyri grundbólkarnar roknast sum teirra lutfalsliga útreiðsla av húsarhaldsnýtsluni samanlagdari.
Til dømis er mett um, hvussu stórur partur av húsarhaldsnýtsluni í Føroyum fer til at keypa "rugbreyð", sum so fær henda partin sum vekt í vektargrundarlagnum.
Nýtslan av rugbreyði saman við øðrum breyði gevur vektina fyri "breyð".
Breyð saman við øðrum kornvørum er parturin hjá "breyði og kornvørum".
Keyp av breyði og kornvørum saman við øðrum matvørum gevur okkum lutfalsligu nýtsluna fyri allar matvørur.
Matur saman við drekka er parturin hjá høvuðsbólkinum "matur og drekka", sum saman við hinum 11 høvuðsbólkunum er øll húsarhaldsnýtslan.

**Mynd 2.1 Yvirlit yvir flokking av húsarhaldsnýtsluni eftir COICOP**




Vektargrundarlagið kann sostatt lesast á øllum stigum, frá teimum 12 høvuðsbólkunum niður á teir 300 grundbólkarnar.

At skipa húsarhaldsnýtsluna í grundbólkar við vektum eftir teirra lutfalsliga útreiðslum hevur avgerandi týdning fyri útrokningina av brúkaraprístali. Vektirnar gera av, hvussu stóra ávirkan ein prísbroyting á einari vøru ella tænastu fær á brúkaraprístalið samanlagt. Til dømis dugir tað ikki, at ein príshækking á pípureinsarum upp á 5 % fær eins stóra ávirkan á brúkaraprístalið sum ein 5 % príshækking á mjólk. Uttan vektir hava allar prísbroytingar eins stóran týdning fyri útrokningina av brúkaraprístalinum.

# 3. kap. Bygnaðurin í brúkaraprístalinum

## Mynd 3.1. Grundbólkarnir og onnur hugtøk í brúkaraprístalinum

*Úr erva :* *Greining av húsarhaldsnýtslu um grundbólk til vøru í handli*
*Úr neðra :* *Frá vøru í handli um grundbólk til brúkaraprístal samanlagt*



Brúkaraprístal er eitt vigað miðalprístal av prístølum fyri allar grundbólkarnar. Hesir grundbólkar samanlagt umfata alla nýtsluna í brúkaraprístalinum. Í hesum kapitli verður bygnaðurin í brúkaraprístalinum viðgjørdur við denti á grundbólkin, eitt yvirlit yvir hvussu komið verður frá túsundtals prísum fram til eitt prístal.

### Grundbólkurin

Sum mynd 3.1 vísir eru grundbólkarnir beinagrindin í brúkaraprístalinum. Hvør grundbólkur fevnir um keyp húsarhaldsins av nágreiniliga avmarkaðum vørum ella tænastum.
Grundbólkarnir eru teir smæstu bólkarnir, sum prístal verða roknað fyri og verða soleiðis, sum vit velja at seta vørurnar og tænasturnar saman í COICOP-nummarskránni.
Dømi um hesar grundbólkar kunnu vera rugbreyð, rís, epli, rómi, sjónvarp, húsaleiga, fartelefontænastur, barnagarðspláss, tannlækni, frítíðarferð uttanlands, døgurði á matstovu o.s.fr. Soleiðis er føroyska brúkaraprístalið uppbygt av teimum 300 grundbólkunum.

## 3.1 Meginreglur fyri skipan av grundbólkum

Sum nevnt í 2. kap. skulu grundbólkarnir vera skipaðir soleiðis, at ein vøra og tænasta í vektargrundarlagnum er í einum og bara einum grundbólki.

Fyri at prístalið skal endurspegla prísgongdina so álítandi sum møguligt, hevur tað týdning at seta grundbólkarnar saman við umhugsni.
Í ein mun syrgir COICOP-nummarskráin fyri, at húsarhaldsnýtslan er skipað í nýtslubólkar, sum eru samansettir av vørum og tænastum, sum antin hava sama nýtsluendamál, ella sum eru skyldar á tann hátt, at tær kunnu skiftast út hvør við aðra í nýtsluni.
Fyri at minka um skeivleikar í útrokningini av brúkaraprístalinum mugu onnur fyrilit eisini takast:

- Grundbólkar - serstakliga tungir grundbólkar - skulu vera samansettir av vørum ella tænastum, sum kunnu haldast at líkjast í prísgongd. Har hetta ikki gerst, er frægast at taka prísir fyri meira enn eina vøru í grundbólkinum.
- Vørur ella tænastur, har prísirnir við vissu kunnu sigast at ganga hvør sín veg, skulu ikki í sama grundbólk
- Nógvir grundbólkar - við nøkulunda eins vekt - er betri enn fáir grundbólkar við stórum vektarmuni. Tað er sjálvsagt ómøguligt at skipa allar grundbólkar við eins vektum, men hetta skal havast í huga, tí eins vektir útihýsa sínámillumávirkan millum grundbólkaprístal og grundbólkavekt.

## 3.2 Frá handilsprísum til endaligt prístal

Útrokningin av brúkaraprístali fer fram í fleiri stigum. Á hvørjum stigi verða ymiskar vektir og ymiskir útrokningarformlar nýttir. Bygnaðurin í brúkaraprístalinum frá niðasta stigi til endligt brúkaraprístal sæst á mynd 3.2 á næstu síðu.

### Trý høvuðsstig

Hesi stigini kunnu samanfatast í trý høvuðsstig - og tríggjar roknihættir - har ið grundbólkurin er markið millum stigini:

1. Fyri hvønn grundbólk verður fyrst grundbólkaprísurin roknaður sum miðal av eindarprísum, sum aftur eru roknaðir sum miðal av handilsprísum (handilsbólkaprísum).
   Hesar útrokningar eru tær nógv mest umfatandi, truplastu og vandamestu, og verða tí mest greinaðar.
2. Fyri hvønn grundbólk verður síðan grundbólkaprístal roknað sum grundbólkaprísur býttur við grundbólkaprísinum tíðarskeiðið frammanundan.
3. At enda verður brúkaraprístal roknað sum eitt vigað miðalprístal av øllum grundbólkaprístølum, har vektirnar eru nýtslupartarnir í grundbólkunum, tað er vektargrundarlagið. Sum stig á vegnum verða útrokningar av bólkaprístali.

**Mynd 3.2 Bygnaðurin í brúkaraprístalinum**




## 3.3 Grundbólkaprísir

Grundstøðið undir útrokningini eru teir umleið 13.000 prísirnir, sum verða tiknir fyri útvaldar vørur og tænastur hvørt prístalsskeið. Teir eru handilsprísirnir niðast á mynd 3.2.

Tað ber sjálvsagt ikki til at taka prísir fyri allar vørur og tænastur, sum húsarhaldsnýtslan fevnir um. Og tað er heldur ikki neyðugt fyri mátingina av prísgongdini, soleiðis sum grundbólkarnar eru samansettir av vørum og tænastum eftir COICOP-nummarskránni.

### Eind at umboða grundbólk

Úr hvørjum grundbólki verður í minsta lagi ein vøru- ella tænastueind vald at umboða grundbólkin. Dømi um eindir eru "kornfleks" í grundbólkinum "morgunmatarkorn", "føroyskur rómi" og "útlendskur rómi" í grundbólkinum "rómi", "leið 400 Tórshavn-Fuglafjørður" og "leið 100 Tórshavn-Vestmanna" í grundbólkinum "flutningur millum bygda" o.s.fr. Valdu eindirnar umboða so miðalprísgongdina fyri allar vørurnar ella tænasturnar í grundbólkinum. Meginreglan fyri hesum vali av eindum er týdningur teirra í grundbólkinum, at tað er høvuðsvørur ella tænastur í grundbólkinum.

**Talva 3.1 Dømi úr grundbólkinum "vørur virkaðar úr eplum"**

| Coicop-nr. | Vøruheiti | Nýtsla kr. | Vekt í grundbólkinum |
|---|---|---|---|
| 01.1.7.2.2.01 | Kips | 3.000.000 | 32,2% |
| 01.1.7.2.2.02 | Eplaflykrur | 6.000.000 | 64,4% |
| 01.1.7.2.2.03 | Eplamjøl | 60.000 | 0,6% |
| 01.1.7.2.2.04 | Eplaflakar | 60.000 | 0,6% |
| 01.1.7.2.2.05 | Epli, fryst | 200.000 | 2,1% |
| **01.1.7.2.2** | **Vørur virkaðar úr eplum** | **9.320.000** | **100,0%** |

Um tvær ella fleiri vørur ella tænastur í einum grundbólki verða mettar at hava stóran týdning, og serstakliga um ivi er um, at prísgongdin er eins, so kann vera rættari at velja fleiri eindir at umboða grundbólkin, og prísir skulu so takast fyri allar valdu eindirnar. Í hesum føri er so eisini møguleiki at geva hvørjari sína vekt - eindarvekt - eftir sølu teirra í grundbólkinum, um tað verður hildið at geva rættastu mynd av prísgongdini.
Dømi í talvu 3.1 omanfyri sýnir grundbólkin "vørur virkaðar úr eplum", hvussu hann er samansettur av vørum úr innflutningsskránni. Úr hesum grundbólki eru høvuðsvørurnar "eplaflykrur" og "kips" valdar sum eindir, og umboða tær ikki bara seg sjálvar, men eisini hinar vørurnar í grundbólkinum.

Í føroyska prístalinum eru samanlagt 528 eindir, sum prísir verða tiknir fyri.

### Seks handilsbólkar

Meginparturin av tiknu prísunum er fyri gerandisvørur, og fyri tær eru handlarnir skipaðir í handilsbólkar: FK-handlar, Bónus-handlar, Samkeyps-handlar, Merko-handlar og Miklagarðar. Haraftrat er ein handilsbólkur samansettur av 10 øðrum handlum, sum hava mestu sølu uttan fyri omanfyri nevndu. Samanlagt eru úti við 60 handlar í hesum handilsbólkum.

### Handilsprísir

Fyrsta stig í útrokningini er í hvørjum handilsbólki at rokna miðalprís fyri allar tiknu prísirnar á eindini, ein handilsbólkaprís. T.d. um vit hava tikið 7 prísir fyri eindina "føroyskur rómi" frá FK-handlum, so verður miðal av hesum prísum í FK roknað fyrst. Soleiðis verður ein handilsbólkaprísur á føroyskum róma roknaður í øllum seks handilsbólkunum.
Á sama hátt verða handilsbólkaprísir roknaðir fyri eindina "útlendskur rómi".

### Eindarprísir og handilsbólkavektir

Annað stig er fyri hvørja eind at rokna miðal av hesum handilsbólkaprísunum, t.e. eindarprísir. Í døminum ein eindarprís fyri teir seks handilsbólkaprísirnar ávikavist á føroyskum róma og á útlendskum róma.

Fyri allar gerandisvørur, har mesta sølan er í vanligum handlum við húshaldsvørum, eru handilsbólkavektir nýttar til útrokningina av eindarprísum. Hesar vektir eru ásettar eftir marknaðarpartinum hjá teimum seks handilsbólkunum.
T.e. at prísirnir á øllum hesum gerandisvørum hava somu vekt í einum handilsbólki.
Sum meginregla skuldu hesar handilsbólkavektir verið ásettar fyri hvørja eind eftir marknaðarpartinum hjá hvørjum handilsbólki fyri eindina.

At nýta marknaðarpartin hjá handilsbólkum sum handilsbólkavektir merkir, at sama um til dømis 6 ella 7 prísir á føroyskum róma verða tiknir frá einum handilsbólki, so hevur miðalprísurin í hesum handilsbólki somu vekt í útrokningini av eindarprísinum á føroyskum róma.
Í undanfarna brúkaraprístali varð eingin munur gjørdur á stórum og smáum handlum, prís-

broytingar í minsta handlinum høvdu eins stóra ávirkan á brúkaraprístalið sum í tí størsta. Hetta kann hava við sær skeivleikar í mátingini av veruligu miðalprísbroytingini, sum ikki bara verður ávirkað av einstøku prísbroytingini í handlum, men eisini av hvussu sølan er býtt eftir handlum.
Við handilsbólkavektum hava prísbroytingar í handilsbólkum ávirkan á brúkaraprístalið eftir sølu teirra.

### Grundbólkaprísir og eindarvektir

Á øðrum útrokningarstigi eru eindarprísir funnir fyri eindirnar í grundbólkunum.
Triðja stig er fyri hvønn av teimum 300 grundbólkunum at rokna miðal av eindar-prísunum fyri tær eindir, sum eru í grund-bólkinum, ein grundbólkaprís. Í døminum miðal av báðum eindarprísunum á ávikavist føroyskum og útlendskum róma.
Er bara ein eind í grundbólkinum, so er eindarprísurin eisini grundbólkaprísurin.
Eru fleiri eindir í grundbólkinum, verður grundbólkaprísurin roknaður sum vektað miðal av eindarprísunum. T.d. vektað miðal av eindarprísunum fyri føroyskan róma og útlendskan róma
Hesar eindarvektir týða, hvussu stórur nýtslupartur ein eind er av nýtsluvirðinum samanlagt í einum grundbólki. Í døminum omanfyri, hvussu stórur nýtsluparturin av ávikavist føroyskum og útlendskum róma er av rómanýtsluni hjá húsarhaldunum samanlagt.

Broytast t.d. prísirnir á føroyskum og útlendskum róma, hevur prísbroytingin á føroyskum róma størri ávirkan á prís-broytingina á róma samanlagt, alt eftir hvussu nógv sølan av føroyskum róma er størri enn av útlendskum róma.

Útrokningin av grundbólkaprísi fyri róma er eitt dømi, har bæði handilsbólkavektir og eindarvektir verða nýttar. Sum nevnt eru handilsbólkavektir serliga nýttar fyri tær gerandisvørur, sum fyri tað mesta verða keyptar í vanligum handlum við húshalds-vørum.

Eindarvektir kunnu sjálvsagt einans ásetast, um tað er møguligt at skilja nýtsluna í sama grundbólki í eindir. Í døminum við grund-bólkinum “vørur virkaðar úr eplum” ber til at geva eindunum “eplaflykrur” og “kips” vektir eftir sølu teirra í grundbólkinum, ávikavist tveir triðingar og ein triðing.

Samanfatandi er útrokningin av grundbólka-prísum grundað á prísir, handilsbólkavektir og eindir. Í einum grundbólki kunnu vera ein eind ella fleiri eindir, og til eina eind kunnu handilsbólkavektir vera knýttar. Sostatt eru hesir fýra møguleikar fyri útrokning av grund-bólkaprísum, sum víst á talvuni niðanfyri.

Hvør av hesum møguleikum ger av, hvussu komið verður fram til grundbólkaprísin.

---

**4 møguleikar**

| **Eind** / **Vekt** | Fleiri eindir | Ein eind |
|---|---|---|
| Við handilsbólkavekt | **Dømi 3.1** | **Dømi 3.2** |
| Uttan handilsbólkavekt | **Dømi 3.3** | **Dømi 3.4** |

---

**Dømi 3.1** **Útrokning við bæði handilsbólkavektum og eindarvektum**




Dømi 3.1 sýnir, so einfaldt sum til ber, hvussu komið verður fram til ein samanfataðan grundbólkaprís fyri grundbólkin róma, samansettan av eindunum føroyskum og útlendskum róma, hvør við sínari eindarvekt eftir lutfalsligu sølu teirra.
Prísir fyri umboðandi vørur fyri hvørja eind verða í hesum dømi tiknir úr fýra handlum, tveimum úr handilsbólkinum FK og tveimum úr handilsbólkinum Samkeypi. Hvør av hesum handilsbólkum hevur eina handilsbólkavekt fyri eindirnar eftir marknaðarparti teirra.

Um bara ein eind er í grundbólki, so er sum nevnt eindarprísurin eisini grundbólkaprísurin.

Dømi 3.2 sýnir dømi um grundbólk við einari eind, hveiti, har handilsbólkavektir verða nýttar. Grundbólkaprísurin á hveiti verður roknaður sum vektað miðal av handilsbólkaprísunum. Vektirnar eru tær handilsbólkavektir, sum greitt er frá omanfyri.

Skipanin gevur eisini møguleika fyri at áseta handilsbólkavektir, har t.d. fáir veitarar eru av somu eind. Hetta gerst alt meira átrokandi, nú einkaveitarar á t.d. fjarskiftistænastum og tryggingum fara í søguna.

**Dømi 3.2** **Útrokning bara við handilsbólkavektum**



Handilsbólkavektir eru ikki nýttar fyri gerandisvørur, har stórur partur av søluni er í kioskum, bensinstøðum og bakarabúðum, tí sølan hjá hesum veitarum er heilt øðrvísi samansett enn í gerandishandlum. Tá ið undantiknar eru nakrar bakarabúðir, sum meira líkjast gerandishandlum, eru nevndu handilssløg ikki flokkað í handilsbólkar. Hesi handilssløg eru tó sera væl umboðað í brúkaraprístalinum fyri tær vørur, sum eru teirra fremstu.

Dømini 3.3 og 3.4 sýna, hvussu komið verður frá handilsprísum til grundbólkaprís fyri vørubólkar, har handilsbólkavektir ikki verða nýttar.
T.d. er grundbólkurin ”vørur virkaðar úr eplum” - dømi 3.3 - samansettur av eindunum “kips” og “eplaflykrur”. Fyri hvørja av hesum eindum verður fyrst óvektað miðal av prísunum frá øllum gerandishandlum, kioskum og bensinstøðum roknað. Grundbólkaprísurin er síðan roknaður sum vektað miðal av hesum báðum eindarprísunum. Vektirnar eru eindarvektir, sum frágreitt omanfyri.

Fyri summar tænastur, sum bara hava ein veitara, verður hesin útrokningarháttur eisini nýttur. T.d. er grundbólkurin “flutningur millum bygda” samansettur av fleiri eindum, høvuðsleiðunum hjá Bygdaleiðum, og eindarvektirnar eru lutfalsligu ferðaútreiðslurnar á leiðunum. Á sama hátt við grundbólkinum “flutningur sjóvegis innanoyggja”.

Dømi 3.4 sýnir eindfaldastu útrokningina av grundbólkaprísum. Í grundbólkinum “sigarettir” er bara ein eind, og grundbólkaprísurin verður roknaður beinleiðis sum miðal av øllum tiknu prísunum, t.e. eindarprísurin er eisini grundbólkaprísurin.

Sum nevnt eru handilsbólkavektir ikki nýttar fyri gerandisvørur, har stórur partur av søluni er í kioskum, bensinstøðum og bakarabúðum. Umframt sigarettir kunnu nevnast sodavatn, eplaflykrur, góðgæti o.l.

**Dømi 3.3** **Útrokning bara við eindarvektum**




**Dømi 3.4** **Útrokning við ongum vektum**



### 3.4 Grundbólkaprístal

Øll henda útrokning endar við tí sama úrsliti - einum samanfataðum grundbólkaprísi, t.e. einum miðalprísi fyri allar vørur ella tænastur, sum grundbólkurin fatar um.

Eftir hesum grundbólkaprísi verður fyri hvønn grundbólk grundbólkaprístal roknað sum grundbólkaprísur býttur við grundbólkaprísinum tíðarskeiðið frammanundan. T.d - sum víst á talvu 3.2 - um grundbólkaprísurin fyri grundbólkin róma er 10,50 kr., meðan hann seinasta prístalsskeið var 10,00 kr., so er grundbólkaprístalið hetta prístalsskeiðið samanborið við seinasta prístalsskeið 10,50/10,00*100 = 105,0, ein prísvøkstur upp á 5 %.

### 3.5 Brúkaraprístal og bólkaprístal

Eftir at øll grundbólkaprístøl eru funnin, verður brúkaraprístalið roknað sum eitt vigað vanligt (aritmetiskt) miðal av øllum grundbólkaprístølum. Vektirnar eru lutfalsliga nýtslan í grundbólkunum.

Eisini kann brúkaraprístalið roknast um bólkaprístal, sum síðan verða samanfatað í endaligt brúkaraprístal. Úrslitið er tað sama.

Føroyska brúkaraprístalið verður frá grundbólkaprístali roknað soleiðis, at bólkaprístøl verða roknað á fleiri stigum. T.d. verður prístal fyri grundbólkin “rugbreyð” saman við prístali fyri ”annað breyð” samanfatað til prístal fyri undirbólkin “breyð”, sum aftur saman við prístali fyri ”kornvørur” verður samanfatað til prístal fyri “breyð og kornvørur”. Hetta saman við prístølum fyri aðrar matvørubólkar verður so prístal fyri “matvørur”, sum aftur saman við ”drekka” verður samanfatað til prístal fyri fyri høvuðsbólkin “mat og drekka”. At enda verður so brúkaraprístal samanlagt roknað við at samanfata prístal fyri allar tólv høvuðsbólkarnar.

Á hvørjum stigi verða grundbólkavektirnar samanfataðar upp til húsarhaldsnýtsluna samanlagt.

**Talva 3.2** **Útrokning av grundbólkaprístali**

| | Tíð 0 | Tíð 1 |
|---|---|---|
| Grundbólkaprísur – rómi | 10,00 | 10,50 |
| **Grundbólkaprístal – rómi** | **100,0** | **105,0** |

# 4. kap. Prístøka

## 4.1 Stakroyndin

Fýra ferðir um árið verður ein stakroynd á umleið 13000 prísir á umboðsvørum frá meira enn 300 veitarum tikin, miðjan februar, mai, august og november. Hetta er galdandi fyri flestar vørur og tænastur.
Summar prísir er tó ikki neyðugt at taka meir enn árliga, t.d. fyri útvarpsgjald, elnýtslugjald. Hesir prísir verða so fluttir fram hvønn ársfjórðing til næstu broyting.
Einstakir prísir, á brenniolju, bensini og dieselolju, verða tiknir mánaðarliga, og fyri hvønn ársfjórðing verða so 3-mánaða miðalprísir roknaðir til brúkaraprístalið. Grundin er, at hesir prísir kunnu skifta sera títt og ógvusliga.

Brúkaraprístal verður so roknað við at samanbera miðalprísirnar ein ársfjórðing við ársfjórðingin frammanundan. T.d. verður brúkaraprístalið 1. januar roknað við at samanbera miðalprísirnar í november og august.
Stakroynd av veitarum og vørum og tænastum er grundstøðið undir hesari útrokningini. Brúkaraprístalið skal vísa prísgongdina fyri tær vørur og tænastur, sum húsarhaldið veruliga keypir og nýtir. Fyri at fáa eitt so rætt brúkaraprístal sum møguligt ger tað tí allan munin, at henda stakroynd í royndum endurspeglar nýtslumynstrið hjá húsarhaldinum.

Skipanin av húsarhaldsnýtsluni í grundbólkar og valið av umboðandi eindum úr grundbólkum at taka prísir fyri tryggjar lutvíst, at stakroyndin umboðar veruliga nýtslumynstrið. Fyri hvørja eind í grundbólkunum er tað haraftrat neyðugt at finna fram til:

- hvørjir veitarar selja hesa eind, og umboðandi veitarar, har prísir verða tiknir, skulu veljast út. Valdu veitararnir umboða so allar veitararnar, sum selja hesa eindina.
- í hvørjum vøru- ella tænastuskapi eindin verður seld, og umboðandi skap skulu veljast út at taka prísir fyri, t.d. hillavørur í handlum. Hesi valdu skap umboða so prísgongdina fyri øll møgulig frábrigdi av eindini, sum veitarar hava at selja.

Høvuðskrøvini til stakroyndina eru sostatt, at veitarar skulu vera umboðandi, og vøru- og tænastuskapið skal vera umboðandi.
Haraftrat skal hugsast um arbeiðsbyrðina av prístøkuni bæði hjá veitarum og hjá Hagstovuni.

## 4.2 Val av veitarum

Stakroyndin av veitarum til føroyska brúkaraprístalið er vald við vanligum skynsemi og metingum og ikki eftir ávísari hagfrøðiligari uppskrift. Ein grundin til hetta er vantandi hagfrøðilig vitan og skráseting viðvíkjandi søluni hjá teimum einstøku veitarunum av teimum ymisku nýtslubólkunum. Eisini krevur tað stóra arbeiðsorku at gera eina slíka stakroynd eftir hagfrøðiligum háttalag. Haraftrat vísa royndir aðrastaðni, at við somu arbeiðsorku verður úrslitið betri, um stakroyndin er vald við vanligum skynsemi.
At stakroyndin veruliga umboðar veitararnar, har sum húsarhaldið keypir nýtslu sína, setir fleiri krøv:

- Avgerandi er, at veitarar, sum selja nógv av eindini, eru við.
- Um ólíkir veitarar selja eindina, so skulu øll týðandi sløg av veitarum vera umboðað.
- Landið alt skal vera umboðað eftir sølu av eindini.

### Stóran umsetning

Í fyrsta lagi eru veitarar valdir eftir sølu teirra. Allir veitarar eru í føroysku vinnugreinaskránnni flokkaðir eftir, hvat slag av vørum og tænastum, teir framleiða og selja. T.d. handlar við húshaldsvørum, konufólkaklædnahandlar, smásøla við innbúgvi, elhandlar, matstovur, fjarskiftisveitarar, koyriskúlar, hárfríðkanarstovur o.s.fr. Soleiðis er vinnugreinaskráin sundurgreinað í fleiri hundrað vinnugreinir, og eftir hesum hevur so borið til at skilt veitararnar eftir, hvat teir framleiða og selja.

Hvussu stór sølan er hjá veitarum í hvørjari vinnugrein er uppgjørt eftir mvg-skránni og í roknskapum.

**Veitarasløg**

Ólík veitarasløg selja ofta somu eindir. T.d. eru nógvar gerandisvørur at fáa - umframt í handlum við húshaldsvørum - eisini á bensin-støðum, í bakarabúðum og kioskum. Her hevur tað týdning, at teir stóru veitararnir av eindini í øllum veitarasløgum eru umboðaðir. Hetta er serliga galdandi fyri eindir sum sodavatn, sigarettir, kremkeks, eplaflykrur o.l., sum í stóran mun eisini verða seldar uttan fyri vanligar handlar við húshaldsvørum.
Hvørjar eindir fáa handilsbólkavekt, er eisini avgjørt eftir hesum, soleiðis at eindir sum sodavatn, sigarettir o.l. ikki fáa handilsbólka-vekt, men annars allar vanligar gerandiseindir, soleiðis sum greitt er frá í 3. kap.

**Øki**

Fyri rættleikan í brúkaraprístalinum er tað umráðandi, at øll øki í landinum, har veitarar hava lutfalsliga týðandi sølu av einari eind, eru umboðað fyri eindina í stakroyndini.
Tá veitarar skulu veljast at umboða eina eind í ymsu økjunum, er tað eisini umráðandi at skilja ímillum keyp hjá búføstum á einum øki og sølu hjá veitarum á økinum.
T.d. tá ið vágafólk keypa í Havn, so verður henda søla skrásett í Havn, um enn nýtslan fer fram í Vágum. Tá er tað prístøkan fyri hesa sølu hjá veitara í Havn, ið telur fyri útrokningina av prísgongdini, og ikki nýtslan í Vágum. Tað er jú sølan av eindunum á økjunum, ið umræður.

Mynd 4.1 vísir eitt sera einfalt hugsað dømi, um munin millum keyp hjá búføstum og søluna á einum øki. Í døminum er nýtslan flokkað í tveir nýtslubólkar, matvørur og klædnavørur, og eftir tveimum økjum, Havnini og á bygd.
Um ein triðingur av fólkinum býr í Havn, og nýtslumynstrið er eins í Havn og á bygd, so keypa havnarfólk og bygdarfólk ávikavist ein triðing og tveir triðingar av bæði matvørum og klædnavørum. Hetta býti sæst á teigi 1.
Upplýsingar eru tó ikki um hetta býtið, tí húsarhaldskanning er ikki gjørd av nýtsluni eftir økjum. Men hóast hetta keypsmynstur varð funnið, so hevði tað verið eitt mistak at valt veitarar eftir hesum mynstri til at umboða søluna. Tí um teig 2 - havnarkeyp á bygd og bygdarkeyp í Havn - koma vit fram til teig 3 og 4, sum vísa søluna í Havn og á bygd ávikavist eftir nýtslubólkum og samanlagt.
Um somu tíð sum keypið av bæði matvørum og klædnavørum hjá havnarfólki er ein triðingur í hesum dømi, so er sølan í Havn samanlagt meira enn helvtin av allari søluni. Av matvørum sløk helvt og av klædnavørum meira enn tveir triðingar.
Tað er eftir hesari sølu á økjum, at veitarar eru valdir út at umboða nýtsluna av teimum ymisku eindunum.

Mvg-sølan hjá veitarum eftir vinnugreina-skránni er eisini býttur eftir økjum í landinum. Soleiðis hevur borið til fyri eindirnar at meta um høvuðsveitarar kring alt landið.
Øll høvuðsøki eru sostatt umboðað í stak-royndini eftir lutfalsligu søluni av vøru- og tænastubólkum á økinum. Eftir hesum er so mett um søluna av eindunum á økjunum.

Mynd 4.2 sýnir lutfalsliga fólkatalið eftir høvuðsøkjum, samanborið við lutfalsliga gerandisvørusøluni hjá veitarum, sum eru umboðaðir í stakroyndini.

**Mynd 4.1** **Keyp hjá búføstum á økjum, afturímóti søluni á økjum**




**Mynd 4.2** **Samanbering av fólkatali 1. jan. 2000 og søluni av gerandisvørum í 1999, umboðað í stakroynd, býtt eftir høvuðsøkjum**

**Streymoy**
Fólkatal: 45,3 %
Søla av gerandisvørum: 52,1 %

**Eysturoy**
Fólkatal: 22,0 %
Søla av gerandisvørum: 17,1 %

**Norðuroyggjar**
Fólkatal: 12,8 %
Søla av gerandisvørum: 9,6 %

**Vágar**
Fólkatal: 5,8 %
Søla av gerandisvørum: 5,9 %

**Sandoy**
Fólkatal: 3,2 %
Søla av gerandisvørum: 2,3 %

**Suðuroy**
Fólkatal: 11,0 %
Søla av gerandisvørum: 13,0%

## 4.3 Val av umboðsvørum og -tænastum

Eins og valið av veitarum er stakroyndin av vørum og tænastum at umboða eindirnar vald eftir vanligum skynsemi og í samráð við veitarar. Umráðandi er, at valda vøru- ella tænastuskapið veruliga umboðar allar vørur ella tænastur í eindini.

- Avgerandi er, at sølan av hesum valdu skapum, sum prísir verða tiknir fyri, er stór hjá veitara.
- Umráðandi er eisini, at valdu skap eru drúgv á marknaðinum, tí óvissan í brúkaraprístalinum veksur við títtum útskiftingum av vørum.
- Haraftrat skal umhugsast, hvat skap best umboðar prísgongdina í eindini.

Í 3. kap. eru krøv sett til val av eind. Høvuðskravið er, at sølan skal vera mest í grundbólki, t.e. í húsarhaldsnýtsluni.
T.d. er mett, at ”eplaflykrur” er mest selda eindin í grundbólkinum ”vørur virkaðar úr eplum”.
Høvuðskravið til valið av skapi er, at tað er mest selda í handli. Fyri eindina ”eplaflykrur”, í hvørjum líki sølan er mest í handli. Hugsað er bæði um eind, nøgd og nágreiniligt vøruheiti.

Fyri flestar vørur, og serstakliga vanligar gerandisvørur, eru ongar skrásetingar av søluni av einari hillavøru í einum handli. Tær eru tí í flestum førum valdar av handlunum sjálvum, eftir áheitan um at taka prís á teimum mest seldu hillavørunum, sum eisini eru drúgvar á marknaðinum.
Fyri fleiri gerandisvørueindir verður prísur tikin fyri meira enn eina hillavøru at umboða vørurnar í eindini. Grundirnar til hetta eru fleiri.

Í fyrsta lagi tí veitarar og tískil prísir fyri hvørja eind eru lutfalsliga fáir í einum lítlum samfelagi.
Í øðrum lagi vigar tað upp ímóti minking av talinum á prísum, tá vørur verða skiftar út í handli.
Í triðja lagi vigar tað eisini upp ímóti ávirkanini, sum útsøluprísir hava á útroknaða miðalprísin.
Í fjórða lagi er ikki altíð lætt at vita, hvør av mest seldu hillavørunum best umboðar prísgongdina í eindini.

## 2. partur Kanningin av húsarhaldsnýtsluni

## 5. kap. Kanningarháttur

Áður er nevnt, at vektargrundarlagið undir nýggja brúkaraprístalinum er funnið uttan at kanna húsarhaldini eftir nýtslumynstrinum.
Í staðin er kannað um skráir og við fyrispurningum hjá veitarum, hvussu stórur partur av allari vøru- og tænastuframleiðslu í Føroyum og øllum innflutningi endar sum nýtsla í húsarhaldinum, og hvussu henda nýtsla er samansett.
Kanningini tekur støði í, at øll nýtsla í Føroyum hevur sín uppruna í tilfeinginum av hesari framleiðslu og hesum innflutningi.

### 5.1 Keldur

Keldurnar eru í høvuðsheitum hagfrøðiligar skráir yvir sølu hjá føroyskum fyritøkum eftir vinnugreinum: Mvg-skráin og roknskapir, innflutningsskrá eftir vørubólkum og eftir innflytarum. Harumframt fyrispurningar hjá føroyskum framleiðarum, innflytarum og handlum. Eisini er serstøk kanning gjørd fyri býli.

**Mynd 5.1** **Tilfeingi og nýtsla**




Viðm.: Svartir pílar: Beinleiðis til húsarhald
Gráir pílar: Um heil- og smásølu
Hvítir pílar: Vørur og tænastur til vinnu, tað almenna ella útflutnings

Haraftrat eru mangar upplýsingar úr tøkum hagtølum, ársfrágreiðingum og øðrum frágreiðingum nýttar. T.d fyri mentanar- og frítíðartænastur, hagtøl yvir limatal og áskoðarar; fyri ferðing, hagtøl yvir ferðandi og kanning hjá Bornholms Forskningscenter viðvíkjandi ferðing; hagtøl yvir húsarhaldsnýtslu av ravmagni og brenniolju, miðal rúsdrekkanýtslu o.s.fr.
Fyri býlisútreiðslur og leigumarknaðin er serstøk spurnakanning gjørd.

## 5.2 Tilfeingi og nýtsla

Mynd 5.1 vísir, hvussu streymurin av tilfeinginum samanlagt endar sum nýtsla í húsarhaldinum, sum tilfarsnýtsla í vinnuni, almenn nýtsla, íløgur ella sum útflutningur. Svørtu pílarnir mynda streymar av vørum og tænastum, sum enda í húsarhaldinum, hvítu pílarnir eru streymar, har nýtslan er aðrastaðni enn í húsarhaldinum.

Fyri hvørja vøru og tænastu er galdandi, at tilfeingi samanlagt = nýtslu samanlagt.
Málið við kanningini er at finna virðið á tí partinum av tilfeinginum, ið tillutast húsarhaldinum, uppgjørt í søluprísi og skipað eftir nýtslubólkum.

Sum myndin vísir, so endar ein partur av tilfeinginum beinleiðis í húsarhaldinum. Hetta er t.d. galdandi fyri stóran part av føroysku tænastuframleiðsluni til húsarhald. Meðan aðrir partar av tilfeinginum, sum endar í húsarhaldinum, fara um millumliðir, heilsølur og smásølur. Hetta er t.d. galdandi fyri mesta innflutningin til húsarhaldið.

Kanningin fevnir um hesar tættir:

### Tilfeingi

Fyrst verður tilfeingið fyri vøru- og tænastubólkar uppgjørd í støðisprísum. Fyri føroyska framleiðslu er hesin prísur søluvirðið frá fyritøku, og fyri innflutning cif-virðið og tollur.

### Húsarhaldsnýtsla

Síðan verður kannað, hvussu stórur partur av hesum tilfeingi í støðisprísum endar sum nýtsla í húsarhaldinum.

### Í søluprísum

At enda verður hesin partur til húsarhald umroknaður frá støðisprísum til søluprís, sum er tann prísur, húsarhaldið rindar fyri vøruna.

Fyri innflutning er søluprísurin:
Cif-virði + tollur + avgjøld + heilsølu- og smásøluvinningur + meirvirðisgjald.

Fyri føroyska framleiðslu er søluprísurin:
Søluvirði frá virki + avgjøld + vinningur + meirvirðisgjald.

Samstundis sum virðið á húsarhaldsnýtsluni verður funnið, verða vøru- og tænastubólkarnir skipaðir eftir nýtsluendamáli, t.e. COICOP-nummarskránni og í grundbólkar, sum greitt er frá í 2. kap.
Samanlagt gevur hetta nýtslumynstrið í søluprísum fyri alla húsarhaldsnýtsluna, og er hetta vektargrundarlagið undir nýggja brúkaraprístalinum.
Fortreytin fyri at finna húsarhaldsnýtsluna er sostatt, at alt tilfeingið av vørum og tænastum verður funnin fyrst. Síðan skal fyri hvørja vøru og tænastu húsarhaldsnýtslan skiljast burtur úr og gerast upp í søluprísum.

Meginparturin av húsarhaldsvørum í Føroyum kemur uttanífrá, meðan tænastunýtslan hjá húsarhaldunum í mesta mun stavar frá føroyskum veitarum. Tað er tí natúrligt at býta kanningina í tvey, kanning av innflutninginum og av føroyskari framleiðslu.

# 6. kap. Innfluttar vørur

Av innfluttu vørunum, sum fara til húsarhaldið, eru tær fægstu, sum bara eru til nýtslu í húsarhaldinum. Tær eru serliga persónligir lutir og summar vørur til persónliga røkt.

### Til húsarhald og aðra nýtslu

Fyri allarflestu húsarhaldsvørur er galdandi, at hesar vørur eisini eru til tilfarsnýtsla í vinnuni ella til almenna nýtslu. Til dømis verður hópur av matvørum, sum húsarhaldið keypir, eisini keyptur av matstovum, sjúkrahúsum, skipum o.s.fr. Stórur partur av mjølinnflutninginum endar sum breyð í bakaríum. Ein partur av klædnavørum eru arbeiðsklæði. Innflutningurin av bensini og dieselolju er bæði til persónbilar og vinnuakfør. Leiku verða eisini keypt av dagstovnum o.s.fr.

Í sambandi við úrskiljingina av húsarhaldsvørum eru innflutningsvørurnar eyðmerktar antin sum húsarhaldskeyp, sum keyp uttan fyri húsarhaldið ella sum blandaðar vørur, t.e. har ein partur verður keyptur av húsarhaldinum, og annar partur er keyp uttan fyri húsarhaldið. At skilja húsarhaldskeypið burtur úr keypinum av blandaðum vørum samanlagt er ein tann størsti trupulleikin í kanningini. Hetta geldur bæði fyri innfluttu vørurnar og fyri føroyska framleiðslu.

## 6.1 Vøruskráin

Innflutningur Føroya er í vøruskránni sundurgreinaður í umleið 4000 vørubólkar, eftir hvørjum evnum, vøran er samansett av, og hvussu hon er virkað.
Hesir vørubólkar verða í innflutninginum skrásettir við innflutningsvirði (cif). Samstundis verða eisini tollur, avgjøld og innflutnings-mvg skrásett. Veikleikin við innflutningsskránni er í fyrra lagi, at lýsingin av vørunum ofta er leys, og í øðrum lagi, at fleiri vørur kunnu vera flokkaðar undir sama nummari. Soleiðis er tað langt frá altíð greitt, hvørjar vørur ítøkiliga eru í einum vørunummari og vøruheiti, og hvussu býtið er.
Fyri at bøta um, eru í summum førum upplýsingar um samansetingina útvegaðar frá innflytarum. Eisini er skeitt eftir nýtslumynstrinum í Íslandi og Danmark.
Til endamálið, at skilja húsarhaldspartin burturúr og skipa hann í bólkar eftir COICOP-nummarskránni, er nummarskráin í vøruskránni tó ikki hóskandi, tí hon er ikki skipað eftir nýtsluendamálinum við vøruni.

### Innflutningur eftir vøruslag

Vøruinnflutningurin er tí flokkaður umaftur eftir BEC-nummarskránni, Broad Economic Classification, sum skipar innflutningin í umleið 60 høvuðsbólkar eftir slag av vørum, og hvør nýtslan er. Henda flokking sigur meira enn vøruskráin um, hvar ið vøran endar í nýtsluni, tó at hon er sera grov og í mongum føri óálítandi til at skilja húsarhaldspartin burturúr.
Fleiri av hesum BEC-vørubólkum kunnu tó á hesum stigi skiljast burtur úr sum reinur innflutningur til vinnuna, t.d. alifóður, skip, motorakfør og maskinur til vinnubrúk, tilfar til byggivirki og aðra framleiðslu.

## 6.2 Innflytarar

### Innflutningur eftir innflytara

Innflutningurin verður eisini skrásettur eftir, hvør ið flytir inn vøruna, og tí hevur borið til at flokka innflutningin eftir BEC-bólkum eina ferð enn eftir høvuðsinnflytarum. Á henda hátt er virðið á tilfeinginum í støðisprísum (cif+toll) funnið fyri hesar innflytarar:

- Heilsølu
- Smásølu
- Vinnufyritøkur
- Almennar stovnar

### Gerandisvørur

Mett er, at mesti innflutningurin av gerandisvørum hjá smásølum fer til húsarhald. Og at mesti innflutningurin hjá vinnufyritøkum og almennum stovnum er til egna nýtslu.

**Talva 6.1.** **Dømi um innflutningin av gerandisvøru eftir innflytarabólkum og partur til húsarhald. Mett eftir innflutningsskránni**

| **Innflytari** | Heilsøla | Smásøla | Fyritøkur | Alment | Innflutn. samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Innflutnings-partur** | **60%** | **20%** | **10%** | **10%** | 100% |
| **Sølupartur til húsarhald** | ? | Megin-partur | Lítið og einki | Lítið og einki | ? |

Talva 6.1 lýsir í høvuðsheitum tær upplýsingar og ábendingar úr innflutningsskránni, ið eru møguligar at fáa um húsarhaldspartin av einari innfluttari gerandisvøru. Í døminum flyta heilsølur inn 60% av hesari vøru, smásølur 20%, og fyritøkur og almennir stovnar 10% hvør.

Innflytarabólkarnir eru skipaðir eftir føroysku vinnugreinaskránni FV93, og rættleikin í býtinum millum bólkarnar er treytaður av, at skrásetingin av heil- og smásølum og vinnu-fyritøkum í hesari skrá samsvarar við teirra veruliga virksemi.
Annað rað, sølupartur til húsarhald, vísir, at tað serliga er innflutningurin hjá heilsølum av gerandisvørum, sum er trupul at avgera eftir innflutningsskránni, hvar endaliga nýtslan er, t.e. at skilja millum húsarhaldskeyp og annað keyp.

## 6.3 Sølan hjá innflytarum

Fyri meira nágreiniliga at finna húsarhalds-partin av innfluttu vørunum er kannað, hvør ið keypir innfluttu vørurnar frá innflytarum. Fyri gerandisvørur eru fyrst og fremst tær stóru heilsølurnar spurdar um, hvussu stórur partur av innflutningi teirra verður seldur víðari til smásølu, og verður hann roknaður sum húsarhaldspartur. Eisini eru stórhandlar, sum flyta inn ein stóran part av vørum sínum, spurdir um, hvussu søla teirra er býtt eftir keyparum.
Henda spurnakanning er ikki gjørd á vørustigi, men fyri vørubólkar, t.d. morgunmatarvørur, grønmeti o.s.fr. Ætlað er so, at býtið fyri ein-støku vørurnar er eins og mynstrið í bólkinum.

Talva 6.2 vísir dømi um eina vøru, hvussu sølan hjá innflytarabólkum er býtt eftir sølu til húsarhald, onnur og egna nýtslu.

Av heilsøluinnflutninginum av hesari vøru selur heilsølan um smásølu 70% til húsarhald og 30% til onnur. Smásølan selur allan sín innflutning til húsarhald. Meðan innflutning-urin hjá fyritøkum og almennum stovnum av hesari vøru allur er til egna nýtslu.

**Talva 6.2** **Dømi um innflutningsvirðið á einari vøru hjá innflytarabólkum, býtt eftir søluparti til húsarhald, onnur og egna nýtslu. Mett eftir kanning hjá innflytarum**

| **Innflytari** | Heilsøla | Smásøla | Fyritøkur | Alment |
|---|---|---|---|---|
| **Sølupartur til húsarhald** | **70%** | **100%** | **0%** | **0%** |
| **Sølupartur til onnur** | 30% | 0% | 0% | 0% |
| **Egin nýtsla av inn-flutninginum** | 0% | 0% | 100% | 100% |
| **Samanlagt** | 100% | 100% | 100% | 100% |

**Mynd. 6.1** **Dømi um innflutningsvirðið á einari gerandisvøru til húsarhald**




## 6.4 Innflutningur til húsarhald

Burtur úr innflutningi eftir innflytarabólkum, talva 6.1, og søluparti hjá innflytarabólkum til húsarhald, talva 6.2, ber til at rokna, hvussu stórur partur av innflutningsvirðinum á vøruni samanlagt fer til húsarhald. Dømi um hesa útrokning sæst á mynd 6.1.

### Samanlagt til húsarhald

Myndin skal lesast soleiðis, at heilsølur flyta inn 60% av hesari vøru og selja 70% av henni um smásølu til húsarhald. Heilsølur selja sostatt 42% av innflutningsvirðinum á hesari vøru samanlagt til húsarhaldið.
Smásølur flyta inn 20 % av hesari vøru og selja alt til húsarhald, t.e. 20 % av innflutningsvirðinum.

Gjøgnum tey ymisku innflutnings- og søluliðini fara 62% av innflutningsvirðinum á hesari vøru til húsarhald og 38% til onnur, sum svara til eginnýtsluna av innflutninginum hjá bæði vinnuni og tí almenna á 10%, umframt søluna hjá heilsølum til onnur upp á 18%.
Soleiðis er húsarhaldsparturin av allarflestu innfluttu gerandisvørum funnin.

## 6.5 Sølurprísur

Neyðugt er at vita hetta býtið av nýtsluni fyri at kunna gera húsarhaldsnýtsluna av innflutningsvøruni upp í sølurprísum.
Hesin sølurprísur verður, sum nevnt, roknaður við at leggja vinning, avgjøld og mvg aftur at innflutningsvirðinum av húsarhaldspartinum.

### Vinningur

Heilsølu- og smásøluvinningur fyri teir ymisku vørubólkarnar er mettur eftir roknskapum hjá heilsølum og størri handlum, og eftir kanningum hjá støkum veitarum. Talva 6.3 vísir, hvussu vinningur samanlagt er funnin.

**Talva 6.3** **Dømi um vinning av sølu til húsarhald**

| Heilsølu inn-flutnings-partur | Heilsølu-vinningur 20% | Heilsøla til smásølu | Smásølu innflutnings-partur | Keyp hjá smásølum samanlagt | Smásølu-vinningur 30% |
|---|---|---|---|---|---|
| 42 | 8 | 50 | 20 | 70 | 21 |

**Talva 6.4** **Dømi um tilfeingi í støðisprísi og umrokning til søluprís fyri húsarhaldspart í kr.**

| Innflutningur til samans Støðisprísur | Støðisprísur húsarhald | Heil- og smásølu-vinningur | Avgjøld (20%) | Prísur fyri mv.g | Mvg 25% | Søluprísur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | 62 | 29 | 12 | 104 | 26 | 130 |

Umrokning av húsarhaldsparti frá støðisprísi til søluprís sæst á talv 6.4.

Siga vit, at vit hava flutt inn fyri 100 kr. av hesari vøru, so eru 62 kr. til húsarhald. Heilsølu- og smásøluvinningur er samanlagt 29 kr. og avgjøld 12 kr. Prísur fyri mvg er 104 kr. Meirvirðisgjald 25 % verður 26 kr., so prísurin í handli, søluprísurin verður 130 kr.

## 6.6 Aðrar húsarhaldsvørur

Fyri aðrar húsarhaldsvørur enn gerandisvørur, t.d. stór húsarhaldstól, innbúgv, heimateldur og telefonir, eru viðmerkingarnar í talvu 6.1 um sølupart til húsarhald ikki alment galdandi. T.d. eru fleiri serhandlar skrásettir undir smáhandlum, og stórur partur av innflutningi teirra fer til onnur enn húsarhald. Eisini eru einstakar fyritøkur, sum selja ein part av innflutningi sínum beinleiðis til húsarhald.
Fyri hesar vørur er eisini kannað, um stórur partur av smásøluni hjá serhandlum fer til onnur enn húsarhald. Og eisini um ein partur av søluni hjá fyritøkum av innflutningi teirra fer beinleiðis til húsarhald.
Har tað ikki hevur borið til at áseta húsarhaldspart nóg rágreiniliga, eru upplýsingar úr íslendska og danska vektargrundarlagnum nýttar til samanberingar.

## Kap. 7 Føroysk framleiðsla

Av føroyskari vøruframleiðslu eru, eins og í innflutninginum, fáar húsarhaldsvørur, sum bara eru til nýtslu í húsarhaldinum. Afturímóti eru mangar tænastur, har meginparturin er húsarhaldsnýtsla. Til dømis hárfríðkan, kyk-myndasýningar, leiga av sjónbondum, frítíðar- og mentanartænastur sum limagjøld til feløg, atgongugjøld, útvarps- og sjónvarpsgjald, peningaspæl sum V4, gekkur og happadráttur, samfelagsligar tænastur sum barnaansing og frítíðarskúli.
Men tað eru eisini mangar tænastur, sum bæði eru húsarhaldsnýtsla og nýtsla hjá vinnuni, tí almenna og feløgum. Til dømis teletænastur, tryggingar, verkstaðartænasta og ferðing.

Málið við kanningini av føroyskari framleiðslu er fyri hvørja vinnugrein at skilja húsarhalds-partin burturúr og skipa hann í nýtslubólkar eftir COICOP-nummarskránni.

### 7.1 Keldur og háttalag

Mynd 7.1 sýnir meginregluna, hvussu føroysk framleiðsla eftir vinnugreinum verður greinað sundur í nýtslubólkar hjá húsarhaldunum. Hvørjar keldur og kanningarhættir eru nýttir til at meta um framleiðsluvirðið og at skilja húsarhaldsnýtsluna burturúr, veldst um vøru- og tænastuslag, t.e. hvør vinnugreinin er.
Høvuðsreglan hevur verið at nýta tær keldur, ið geva bestar upplýsingar, og haraftrat at nýta fleiri keldur og bera saman upplýsingarnar.

Fyrsta stigið í kanningini av føroyskari framleiðslu er at finna fram til framleiðsluvirðið hjá føroyskum virkjum og fyritøkum eftir vinnu-greinum. Hetta fram-leiðsluvirðið verður uppgjørt í roknskapum og í ymiskum almennum skráum.
Í vinnugreinum við mongum vinnufyritøkum, sum framleiða vørur og tænastur til húsar-haldið, er í høvuðsheitum mvg-skráin nýtt sum høvuðskelda til søluvirði.

Í øðrum vinnugreinum við fáum veitarum eru upplýsingar serstakliga útvegaðar í rokn-skapum og við fyrispurningum hjá høvuðs-veitarum.

Annað stigið er at eyðmerkja tann partin av framleiðsluni, sum fer á marknaðin, og at skilja húsarhaldspartin av framleiðsluvirðinum burturúr. Hetta virðið á húsarhaldspartinum er so sundurgreinað í nýtslubólkar eftir endamáli, t.e. eftir COICOP-nummarskránni.
Til hetta endamál hevur høvuðskeldan verið upplýsingar frá høvuðsveitarum. Í teimum førum, har stór óvissa hevur verið um húsar-haldspartin, er eisini skeitt eftir nýtslumynstri-num í Íslandi og Danmark.

**Mynd 7.1 Føroysk framleiðsla – frá vinnugrein til søluprís fyri húsarhaldspart, skipaður í grundbólkar**



Triðja stigið er at umrokna húsarhaldspartin av søluvirðinum í vinnugreinum til søluprís, t.e. leggja vinning aftrat um sølan fer um millumliðir, og meirvirðisgjald, um sølan er mvg-skyldug.

Kanningin av føroyskari framleiðslu kann býtast í fleiri partar:

- Vøruframleiðslu
- Vanligar tænastur
- Einkaveiting av tænastum
- Frítíðar- og mentanartænastur, uttanlandsferðing
- Heilsu
- Býli

## 7.2 Vøruframleiðsla

Føroysk vøruframleiðsla til húsarhald er ikki stór sammett við vøruinnflutningin. Einstakar vørur eiga tó ein týðandi part ella meginpartin av marknaðinum. Kanningin av húsarhaldspartinum hevur serstakliga fatað um hesar vørubólkar:

Mjólkarúrdráttir, breyð og bakaravørur, lambs- og neytakjøt, fisk, sodavatn og øl, klædnavørur, vaskievni og sápur, pappírsvørur og dagbløð.

Mjólkarúrdráttir til húsarhald og býtið av teimum millum ymisku sløgini er ásett eftir upplýsingum frá framleiðara. Skipaðir eru seks grundbólkar, vanlig, hálvskúmað og skúmað mjólk, jogurt, súrrómi og rómi. Har somu vørur eisini verða innfluttar, verða søluvirðini á føroysku framleiðsluni og innfluttu vøruni løgd saman.

Flestar stórar bakarabúðir selja umframt egna framleiðslu av breyði og bakaravørum eisini alskyns handilsvørur. Sølan til samans í vinnugreinini bakarabúðir er uppgjørd í mvg-skránni.
Parturin av hesari mvg-sølu, sum er egin framleiðsla, er mettur eftir roknskapum hjá størstu bakarabúðunum. Síðan er húsarhaldsparturin av egnari framleiðslu ásettur eftir spurnakanning hjá hesum bakarabúðum, og at enda er sundurgreining eftir vøruslagi ætlað.

**Mynd 7.2** **Bakaravørur – húsarhaldspartur av egnari framleiðslu, skipaður í grundbólkar, uppgjørdur í søluprísi**



Framleiðsluvirðið á kjøti er roknað eftir árliga skurðinum, og húsarhaldspartur er mettur eftir kanning hjá landbúnaðarfeløgum um egin-nýtsluna hjá eigarum, t.e. sum ikki verður selt til annan mann, og tí ikki verður roknað við í húsarhaldsnýtsluna. Søluprísurin á húsarhalds-partinum er fyri lambskjøt roknaður út frá minstaprísinum, fyri neytakjøt eftir keypsprísi hjá sláturvirki, ætlaðari meirvirking hjá virki og hjá stórhandlum, og haraftrat meirvirðis-gjald.
Søluvirðið á fiskavørum til húsarhald er mett eftir spurnakanning hjá ætlaðum høvuðs-framleiðarum til føroyska marknaðin, handils-vinningi og mvg.

Til at meta um húsarhaldspart á sodavatni og øli framleiddum í Føroyum eru fleiri keldur nýttar.
Søluvirðið er mett eftir framleiddum litrum í miðal av árunum 1997-99 og liturprísi í útsølu.
Ølnýtslan er harumframt mett eftir kanning av árligu miðal rúsdrekkanýtsluni í Føroyum, samanborið við býtið millum øl bryggjað í Føroyum og innflutt.
Býtið millum húsarhaldsnýtslu og aðra nýtslu, t.d. hjá feløgum og stovnum, er ætlað.
Síðan er býtið av húsarhaldsnýtsluni millum nýtslu heima og úti mett eftir mvg-søluni hjá vertshúsum og matstovum. Hetta býtið er gjørt, tí prísgongdin verður uppgjørd bæði fyri rúsdrekka, sum verður keypt heim við at njóta, og sum verður keypt á vertshúsum og mat-stovum. Prísgongdin á hesum báðum keypum nýtist nevniliga ikki at fylgjast, tí prísirnir úti verða eisini ávirkaðir av øðrum viðurskiftum enn prísirnir heima.

Húsarhaldsparturin av vaskievnum og sápu er uppgjørdur eftir fyrispurningi hjá framleiðara, og søluprísurin eftir ætlaðum vinningi um-framt meirvirðisgjald.

Sølan av dagbløðum til húsarhald er uppgjørd eftir tøkum hagtølum yvir upplagið av føroyskum bløðum, upplýsingum frá út-gevarum um lutfallið millum haldarar og leysasølu og ætlaðum býti millum húsarhald og stovnar o.l.

Mvg-søla eftir vinnugreinum er ætlað til at finna húsarhaldspartin av framleiddum klædnavørum og pappírsvørum.

Føroyskar bøkur til húsarhald eru leysliga ætlaðar eftir sølu hjá prentsmiðjum.

### 7.3 Tænastur

Nógvar vinnugreinir veita tænastur, sum mestsum burturav eru húsarhaldsnýtsla. Til dømis hárfríðkan, kykmyndasýningar, bila-leiga, koyriskúli og hýruvognur.
Virðið á húsarhaldsnýtsluni er her ásett at vera mvg-sølan í vinnugreinini umframt meirvirðis-gjald.

Aðrar vinnuligar tænastur verða veittar av ymiskum smásølum, t.d. framkalling av filmum og leiga av sjónbondum. Í hesum førum er mvg-sølan óálítandi kelda til at meta um húsarhaldsnýtsluna fyri tænasturnar. Her er eisini hugt eftir nýtsluni í øðrum londum.

Uppaftur aðrar vinnugreinir veita mangar ymiskar tænastur, sum bæði eru til húsarhald og til onnur. T.d. matstovutænastur og verk-staðartænastur.
Her eru teir stóru veitararnir spurdir um býtið millum nýtslu hjá húsarhaldum, vinnu, almennum stovnum og útlendingum. Sum við øllum øðrum tænastum og vørum verður nýtslan hjá útlendingum, t.d. gisting og mat-stovuvitjan, roknað upp í húsarhaldsnýtsluna.
Fyri smærri matstovur, kaffistovur, pylsu-vognar og vertshús er í flestum førum øll mvg-sølan roknað sum húsarhaldspartur.

### Einkaveiting av tænastum

Fleiri tænastur eru eyðkendar av, at veitararnir eru fáir, í summum førum bara ein.
Tær fata um samskiftistænastur sum telesam-skifti og postútbering, flutningstænastur hjá Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum, samfelagsligar tænastur sum barnaansing, heilsutænastur, mentanartænastur sum útvarps- og sjónvarpsgjald og peningaspæl, fíggjar-tænastur frá tryggingarfeløgum og peninga-stovnum, orkuveiting frá SEV (og olju-feløgum).

Húsarhaldsparturin av hesum tænastum og skipanin í hóskandi nýtslubólkar eru mett út frá spurnakanningum hjá veitarum og út frá roknskapum teirra. Í umrokningini frá veitaraprísum til søluprís er roknað við, at summar av hesum tænastum, t.d. útvarps- og sjónvarpsgjøld og teletænastur, eru mvg-skyldugar, meðan aðrar, t.d. fíggjartænastur, ferðafólkaflutningur og barnaansing, eru mvg-fríar.

**Teletænastur**

Fyri teletænastur er virðið á húsarhaldsnýtsluni uppgjørt fyri árið 1998, meðan býtið av hesum tænastum millum fastnet, fartelefon og nettænastur er uppgjørt eftir nýtslumynstrinum í 2000 - tað er nevniliga broytt so munandi seinastu árini, at mynstrið frá 1998 longu er avoldað.

Mynd 7.3 sýnir nýtslumynstrið fyri høvuðsbólkin samskifti, hvussu húsarhalds-nýtslan er sundurgreinað í tríggjar undirbólkar og síðan í fleiri grundbólkar.

**Mynd 7.3 Samskifti - nýtslumynstrið hjá húsarhaldum skipað í undirbólkar og grundbólkar**



**Ferðafólkaflutningur**

Húsarhaldsparturin av flutningstænastum hjá Strandferðsluni og Bygdaleiðum er flokkaður og vektaður í tríggjar grundbólkar:

- Ferðafólkaflutningur millum bygda
- Ferðafólkaflutningur sjóvegis innanoyggja
- Bilaavgjald fyri persónbilar.

Vektirnar eru lutfalsligu ferðaútreiðslurnar í bólkunum. Hvør av hesum grundbólkum er síðan sundurgreinaður í fýra høvuðsleiðir, sum aftur eru vektaðar sínámillum í grundbólkunum.

**Barnaansing**

Útreiðslur til barnaansing umfatar foreldragjøld fyri pláss í vøggustovu, barnagarði, frítíðarskúla og dagrøkt.

**Tryggingar**

Húsarhaldsparturin á tryggingum er mettur út frá roknskapum og fyrispurningi hjá tryggingarfelag. Útreiðslan er uppgjørd netto, t.e. tryggingargjøld minus skaðaendurgjøld, sum enda aftur í húsarhaldinum.
Prísgongdin verður fylgd fyri húsatryggingar og akfarstryggingar, og prísir verða tiknir frá tveimum tryggingarfeløgum. Eftirlønar- og lívstryggingar verða sum nevnt ikki roknaðar sum húsarhaldsnýtsla, men samansparing.

**Peningaspæl**

Eisini peningaspøl verða uppgjørd netto, vinningar eru frádrignir, tí teir enda aftur sum nýtsla í húsarhaldinum. Bara føroysk peningaspøl eru tikin við, happadrátturin, V4 og Gekkur.

**Ymsar frítíðar- og mentanartænastur**

Veitarar av frítíðar- og mentanartænastum sum t.d. atgongumerkjum til ítrótt, tónleik og sjónleik, atgongugjøld til svimjing, limagjøld í feløgum, o.l. eru nógvir í tali, og eisini skiftandi, og verða hesar tænastur tískil skrásettar á nógvum støðum. Tí er sera fløkjasligt at finna húsarhaldsnýtsluna fyri hesar tænastur uttan at spyrja húsarhaldini. Kortini er nýtslan her funnin við hagtølum yvir limatal í feløgum og vitjandi til tiltøk, fyrispurningum hjá feløgum um limagjøld, atgongumerkjaprís o.s.fr. Í summum førum er eisini hugt at nýtsluni í Íslandi og Danmark.

**Uttanlandsferðing**

Eisini ferðaútreiðslurnar hjá húsarhaldum til útlond er trupul at gera upp uttan húsarhaldskanning, hóast keyp føroyinga uttanlands ikki verður roknað við í húsarhaldsnýtsluna, men bara ferðaseðilin.
Ikki tí at ferðaútreiðslurnar eru skrásettar hjá nógvum veitarum, men tí stórur partur av teimum ferðandi eru ikki føroyingar, og av føroyingum á ferð uttanlands er stórur partur í handils- og fundarørindum, á skeið goldin av arbeiðsgevara, til ítróttartiltøk og í sjúkraørindum. Henda ferðing verður skild burturúr, so bara ferðingin hjá húsarhaldum til frítíð og ørindi verður roknað sum húsarhaldsnýtsla.

Ferðaútreiðslurnar hjá húsarhaldunum eru útroknaðar eftir tali á ferðafólki, eftir stakroynd av endamálinum við ferðing føroyinga uttanlands og miðalprísum á ferðaseðlum.
Stakroyndin er partur av størri spurnakanning av ferðandi til Føroya og úr Føroyum, sum Bornholms Forskningscenter gjørdi í samarbeiði við Ferðaráð Føroya í 1999 og 2000.

Eitt úrslit av spurnakanningini er ein meting av, hvussu nógv útlendsk ferðafólk koma til Føroya. Og tá ið tøk hagtøl eru fyri ferðafólkaflutning til samans, loft- og sjóvegis, fæst ein meting av talinum á ferðandi føroyingum uttanlands.
Í kanningini hjá Bornholms Forskningscenter verða eisini búfastir føroyingar spurdir um endamál teirra við ferðini, bæði loft- ella sjóvegis, um tað er frítíðarferð, at vitja skyldfólk uttanlands, til ítróttartiltøk, útbúgving, sjúkuørindi ella handils- og fundarørindi. Eftir hesum lutfalli er talið á ferðandi búføstum, býttum eftir endamáli við ferðini, ætlað. Sum húsarhaldspartur er øll frítíðarferðing, familjuvitjan og útbúgvingarørindi roknað, umframt

ein partur av ferðing í arbeiðsørindum og øðrum ørindum. Virðið á húsarhaldspartinum til ferðing er síðan roknað við miðalprísum á ferðaseðlum og býtt í nýtslubólkarnar frítíðar-ferð og ferðing hjá húsarhaldum í arbeiðs-ørindum uttanlands.

### Heilsa

Hesin bólkur fevnir um heilivág frá einkasøluni Tjaldurs Apoteki og heilsu-tænastur, veittar av tannlæknum, fysiotera-peutum og kiropraktorum. Bólkurin er serligur á tann hátt, at hesar vørur og tænastur verða stuðlaðar av tí almenna og sjúkrakøssum. Í uppgerðini av húsarhaldsnýtsluni er sjúkra-kassagjaldið roknað sum beinleiðis skattur. Endurgjald frá sjúkrakassa er tískil ikki drigið frá útreiðslunum til heilsu. Harafturímóti er endurgjald frá Almannastovuni drigið frá húsarhaldsútreiðslunum.

Fyri húsarhaldsnýtsluna av heilivági er støði tikið í uppgerðini hjá landsapotekaranum um forskriftasølu av heilivági til einstaklingar, meðan heilsutænastur eru uppgjørdar eftir roknskapum.

Grundbólkaprístalið fyri heilivág verður útroknað av landsapotekaranum og verður síðan roknað saman við øðrum grundbólka-prístølum.

# 8. kap. Býli

Í vektargrundarlagnum er býli uppgjørt til ein fimting av húsarhaldsnýtsluni samanlagt og fevnir um tríggjar nýtslubólkar:

- Íbúðanýtslu
- Ravmagn og hita
- Viðlíkahald av bústað

Hesir tríggir bólkar eru so aftursundurgreinaðir í smærri bólkar, sum víst á mynd 8.1.

Samanlagt eru býlisútreiðslurnar roknaðar at vera 652 mill. kr, av hesum eru útreiðslur til íbúðanýtslu 315 mill. kr., t.e. nærum helvtin. Ravmagn og hiti er 248 mill. kr. og viðlíkahald 89 mill. kr.
Av íbúðanýtsluni upp á 315 mill. kr. eru 81 % roknað sum útreiðsla fyri ognaríbúðir og 19 % sum útreiðsla fyri leiguíbúðir.

**Mynd 8.1 Samansetingin av býlisútreiðslum í brúkarapríslalinum og prísir, ið verða útvegaðir**



Útreiðslur fyri ravmagn, hita og viðlíkahald eru prísir eins og aðrir prísir á vørum og tæanstum. Eisini útreiðslan fyri íbúðanýtslu er í grundini ein prísur sum aðrir. Tað er tó ikki sum at siga tað at áseta hesa útreiðsu og at útvega prísir fyri íbúðanýtslu, t.e. hvat tað kostar at hava tak yvir høvdið eitt árið samanborið við onnur ár.

Íbúðanýtslan kann gerast upp á ymiskan hátt, og ilt kann vera at gera av, hvør háttur er rættastur til brúkaraprístalið, serstakliga fyri egnan bústað - sethús og ognaríbúðir - í Føroyum eisini fyri leiguíbúðir, tí leigumarknaðurin er lítil, bæði í tali og lutfalsliga, og er ikki skrásettur.

Men til vektargrundarlagið í brúkaraprístalinum skal eitt peningamát ásetast fyri at búgva, bæði í ognaríbúð og leiguíbúð. Haraftrat skal verða avgjørt, hvussu prísgongdin fyri íbúðanýtslu skal verða fylgd.
Vegna trupulleikan við uppgerðini av býlisútreiðslunum í ognar- og leiguíbúðum og vantandi skrásetingum av leigumarknaðinum, varð spurnakanning gjørd fyri býliútreiðslur í februar 2001.
Á skjali 2 er eitt yvirlit yvir evnini í kanningini.

## 8.1 Íbúðanýtslan í leiguíbúðum

Eitt endamál við spurnakanningini var at kanna, hvussu stórur partur av føroysku húskjunum býr til leigu, og hvussu stór húsaleigan er, at nýta sum vekt fyri húsaleigu í vektargrundarlagnum.
Á talvu 8.1 eru høvuðsúrslit fyri búgv eftir ognar- og leiguíbúðum í Havn, á bygd og fyri landið. Tølini eru ein upprokning av stakroyndini eftir fólkatali.
Kanningin vísir, sum væntað, at sera lítil partur av føroyingum býr í leiguíbúðum, 4.113 fólk ella sløk 9 %. Og av 14.172 húskjum búgva 1.438 til leigu ella góð 10 %. Talvan vísir eisini, at stórur munur er á lutfalsliga leigumarknaðinum í Havn og á bygd.

**Talva 8.1** **Býtið millum ogn og býli, stakroynd upproknað eftir fólkatali.**

| | Havn | Bygd | Landið alt | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | Tal | Tal | % |
| **Fólkatal** | **17.330** | **28.906** | **46.236** | **100,0** |
| Ogn | 14.918 | 27.205 | 42.123 | 91,1 |
| Leiga | 2.412 | 1.701 | 4.113 | 8,9 |
| **Húski** | **5.323** | **8.848** | **14.172** | **100,0** |
| Ogn | 4.440 | 8.294 | 12.734 | 89,9 |
| Leiga | 883 | 554 | 1.438 | 10,1 |

**Talva 8.2** **Stødd á leiguíbúð og húsaleiga í Havn, á bygd og fyri landið**

| | Havn | Bygd | Landið alt |
|---|---|---|---|
| **Miðalstødd á leiguíbúð, $m^2$** | 81 | 113 | 92 |
| **Miðalprísur fyri $m^2$ um árið** | 632 | 239 | 449 |
| **Tal á húskjum** | 833 | 554 | 1.438 |
| **Húsaleiga samanlagt, mill. kr.** | 45 | 15 | 60 |

Talva 8.2 vísir, at miðalstøddin á leiguíbúðin er 92 fermetrar, 81 í Havn og 113 á bygd. Miðalprísurin fyri fermeturin er 449 kr. um árið, 632 kr. í Havn og 239 kr. á bygd.

Húsaleigan fyri landið alt er roknað at vera stívliga 60 mill. kr., og er hon sett sum vekt fyri húsaleigu í vektargrundarlagnum.

## 8.2 Prísgongdin fyri húsaleigu

Til at fylgja prísgongdini á húsaleigu er rættast at velja út eitt ávíst tal á leiguíbúðum at umboða allan leigumarknaðin og síðan fáa upplýsingar um broytingar í húsaleiguni fyri hesar íbúðir. Men av tí at leigumarknaðurin í Føroyum er so sera lítil, og haraftrat heldur ikki er skrásettur, er tó mett, at hetta gerst ikki á ein rættvísandi hátt.

Í staðin verður gongdin í húsaleiguni roknað eftir hagtølum fyri sethúsasølu, sum verða uppgjørd av Føroya Sparikassa. Hetta er gjørt, av tí at broytingar, sum ávirka sethúsaprísirnar, eisini ávirka húsaleiguna sama veg. Roknast kann við, at ein ávís tíð gongur, áðrenn ein broyting í sethúsaprísunum sæst aftur í húsaleiguni fyri leiguíbúðir. Frá íbúðamarknaðinum eru tó ábendingar um, at hetta tíðarskeið er ikki langt, og eisini at broytingar í sethúsaprísunum í stóran mun síggjast aftur í húsaleiguni.

Fyri prísgongdina á húsaleigu í brúkaraprístalinum er ásett, at gongdin í sethúsaprísunum í fullan mun skal ávirka húsaleiguprístalið við hálvt árs seinking.

## 8.3 Íbúðanýtslan í ognaríbúðum

Eingin greið altjóða semja er millum hagfrøðingar og búskaparfrøðingar um, hvussu ognaríbúðir skulu viðgerast í einum brúkaraprístali, og stórur munur er eisini á uppgerðini landanna millum. Endamálið við brúkaraprístalinum kann vera ymiskt, skrásetingar av íbúðamarknaðinum eru ymiskar, og stórur munur er eisini í lutfallinum millum ognar- og leiguíbúðir í ymsu londunum.

Útreiðslur fyri íbúðanýtslu av ognaríbúðum kunnu - eins og nýtsluútreiðslur til vørur og tænastur sum heild - fatast og mátast á ymiskan hátt:

**Útvegan** sipar til, at alt virðið á vørum og tænastum, sum eru *útvegaðar* eitt tíðarskeið, skal roknast sum nýtsluútreiðsla, sama um goldið er fyri tær hetta tíðarskeiðið ella ikki.

**Nýtsla** sipar til, at alt virðið á vørum og tænastum, sum er *brúkt* í einum tíðarskeiði, skal roknast sum nýtsluútreiðsla.

**Gjalding** sipar til, at øll *gjalding* fyri vørur og tænastur í einum tíðarskeiði skal roknast sum nýtsluútreiðsla, sama um tær eru útvegaðar í hesum tíðarskeiði ella ikki.

Tá talan er um keyp av ódrúgvum vørum og tænastum goldnar í hondina, ber ikki til at skilja ímillum hesi mát fyri nýtsluútreiðsluna. Heldur ikki fyri mangar drúgvar vørur er neyðugt at gera nakran skilnað, um goldið verður í hondina.

Fyri flestar vørur og tænastur í føroyska brúkaraprístalinum er roknað við, at húsarhaldsins partur av tilfeinginum av føroyskari framleiðslu og innflutningi í 1998 er keyptur sama ár, og hetta keyp er sett at vera nýtsluútreiðslan hjá húsarhaldunum, sama um ein partur av hesum vørum og tænastum er útvegaður, brúktur ella goldin í 1998 ella ikki.

Henda mannagongd er eisini nýtt fyri keyp av persónbilum og øðrum drúgvum húsarhaldsvørum, hóast nýtslan av teimum fevnir um mong ár, og hóast partur av hesum keypi er lánsfíggjaður.

### Hvat er nýtsluútreiðslan av ognaríbúð?

Útreiðslur fyri íbúðanýtslu, serstakliga nýtslu av ognaríbúð, eru tó so serstakar, at tað ber ikki til at nýta somu mannagongd sum fyri nýtslu av ódrúgvum vørum og tænastum. Ognaríbúð hevur tað natúrliga við sær, at íbúðanýtslan fevnir um eitt langt áramál fram frá útveganarárinum. Og lánsfíggingin av ognaríbúð merkir eisini, at lítið samsvar er millum tíðarskeið fyri útvegan, nýtslu og gjalding. Nýtslan byrjar beinanveg við innflyting, hóast bert ein partur er goldin, og heldur fram, eftir at íbúðin er útgoldin.

Áseting av nýtsluútreiðslu av ognaríbúðum má í stóran mun byggja á, hvørjar upplýsingar um sethúsaprísir, rentu, leigumarknaðin o.a. eru tøkar, hvussu álítandi tær eru, og hvør

kostnaðurin er at troyta fleiri og meiri álítandi upplýsingar.
Spurningurin er, hvat peningavirði skal ásetast fyri nýtsluna av ognaríbúð grundtíðarskeiðið. Og hvørjir prísir eru rættastir at taka fyri at fylgja prísgongdini á hesum peningavirði frameftir.
Niðanfyri er í stuttum tríggir høvuðsmøguleikar settir upp saman við okkara vali.

### a) Marknaðarvirðið á nýbygging

Her verður spurt: Hvør er broytingin frameftir í kostnaðinum á nettoútvegan av ognaríbúðum, t.e. húsabygging, grundtíðarskeiðið?
Nettoútvegan, tí um øll søla og keyp hjá húsarhaldum av gomlum húsum og íbúðum er ímillum húsarhald, so kann hetta keyp og henda søla haldast uttan fyri prístalið, og bara nýggjar ognaríbúðir skulu teljast við. Uppgávan er sostatt at fylgja keypsprísinum á einari stakroynd av nýggjum ognaríbúðum álík teimum nýggju ognaríbúðunum, sum vórðu bygdar grundtíðarskeiðið.

Grundirnar fyri at hesin møguleiki er ikki valdur eru:

- Stóra lánsfíggingin av sethúsum í Føroyum ger, at eginfíggingin eitt ávíst ár bert umboðar ein lítlan part av útreiðslunum fyri íbúðanýtsluna hjá øllum eigarum.
- Broytingar í keypsprísinum á nýggjum íbúðum ávirka í minni mun íbúðaútreiðslunar hjá eigarum enn t.d. rentubroyting. Lítla - og eisini nógv skiftandi - talið á nýbygging í Føroyum hevur eisini við sær, at trupult kann vera ár um ár at finna eina stakroynd av nýggjum ognaríbúðum sum bæði í støðd og dygd eru álík teimum nýbygdu grundtíðarskeiðið.

### b) Nýtslukostnaðurin av ognaríbúð

Her verður spurt: Hvør er broytingin frameftir í kostnaðinum á nýtsluni av egnari íbúðatænastu grundtíðarskeiðið?
Samanborin verður nýtslukostnaðurin fyri eina stakroynd av ognaríbúðum, sum er álík ognaríbúðunum hjá húsarhaldum grundtíðarskeiðið.
Hesin nýtslukostnaður kann t.d. gerast upp við at meta um, hvussu nógva húsaleigu eigarin skuldi goldið um íbúðin var ein leiguíbúð. Ítøkiliga verður so kostnaður ásettur eftir, hvat húsaleigan er fyri eina stakroynd av leiguíbúðum, sum er álík stakroyndini av ognaríbúðunum.
Sum víst á talvu 8.1. er leigumarknaðurin í Føroyum sera avmarkaður, og hartil er hann heldur ikki skrásettur, so tað ber ikki til at áseta, hvussu nógv eigarar í eini umboðandi stakroynd av ognaríbúðum skuldu goldið í húsaleigu, um íbúðirnar vóru leiguíbúðir.
At áseta hesa húsaleigu krevur, at ein stakroynd av leiguíbúðum álík stakroyndini av ognaríbúðum bæði í støðd og dygd verður funnin hvørt prístalsskeið. Og hetta letur seg ikki gera í Føroyum. Tí umframt lítla leigumarknaðin, so vísti býliskanningin eisini, at stórur munur er á støddini á leigu- og ognaríbúðum. Fyri landið alt er meðalstøddin á ognaríbúðum 142 fermetrar og á leiguíbúðum 92 fermetrar. Sí talvu 8.3, sum eisini vísir miðalstøddina í Havn og á bygd.
Sum nevnt er húsaleigan heldur ikki nýtt til at fylgja prísgongdini á leigumarknaðinum.

Aðrir møguleikar at meta um nýtslukostnaðin, t.d. eftir avskrivingum ella mettum kostnaði av at selja ognaríbúðina og seinni keypa hana aftur, eru ikki troyttir.

**Talva 8.3** **Miðalstødd í $m^2$ á íbúðum eftir ogn og leigu í Havn, á bygd og fyri landið**

| | Havn | Bygd | Landið alt |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | 147 | 138 | 142 |
| **Leiga** | 81 | 113 | 92 |

### c) Peningaútreiðslur hjá eigara

Her verður spurt: Hvør er broytingin í peningagjaldinum samanborið við peningagjaldið grundtíðarskeiðið?
Samanborið verður peningagjaldið fyri eina stakroynd av ognaríbúðum, sum er álík ognaríbúðunum hjá húsarhaldum grundtíðarskeiðið.
Hetta peningagjald kann gerast upp sum renta av íbúðalánum ella sum renta og avdráttur.

Eftir at hava vigað vansar, fyrimunir og møguleikar hvørjar móti øðrum, varð avgjørt at seta rentugjaldingina av øllum íbúðarlánum til at umboða nýtsluna av ognaríbúðum, og er henda rentugjalding nýtt sum vektargrundarlag í brúkaraprístalinum.

Avdráttir eru í hesum sambandi ikki mettir at vera nýtsla hjá eigarum av ognaríbúðum, men heldur samansparing.

Rentugjaldingin er ásett brutto fyri restskuld í 2000 og er roknað upp eftir rentustuðlinum, uppgjørdur í landskassaroknskapinum.
Hetta skuldi forða fyri, at ikki ov stórur partur av lánum til onnur endamál enn til egna íbúð eru tikin við. Síðan 1992 eru við fáum undantøkum bara íbúðalán, sum hava rætt til rentufrádrátt/rentustuðul.

Fleiri spurningar og ivamál eru eisini við hesari avgerð.
At siga at rentan er *útreiðslan* fyri íbúðanýtsluna er ikki serliga nøktandi. T.d. um tvey nøkulunda eins húski, sum sita í tveimum eins sethúsum, og annað hevur goldið húsini av sínari samansparing, meðan meginparturin hjá hinum er lánsfíggjað, so kann íbúðarnýtsla teirra eisini metast at vera nøkulunda eins. Men íbúðarnýtslan mátað sum rentuútreiðsla gevur í hesum føri eina heilt aðra mynd.
Húski, sum ikki hava lánsfíggjað húsini, sýnast ikki at hava nakra íbúðarnýtslu, hava ikki útvega sær íbúðina, meðan íbúðarnýtslan hjá húskjum við fullari lánsfígging er ovurhonds stór.
At seta rentugjaldingina av øllum íbúðarlánum til at umboða nýtsluna av ognaríbúðum merkir, at øllum húsarhaldum verður líknaður eins stórur partur av hesari rentuútreiðslu.

Ein annar trupuleiki við at seta rentuútreiðslur til íbúðarnýtslu er íkomin av nýggja møguleikanum at taka sethúsalán við fastari rentu.
Tá ávirka broytingar í rentuni ikki rentugjaldingar á hesum lánum. Henda spurning er neyðugt at taka við, tá brúkaraprístalið aftur verður endurskoðað.
Eisini er ein trupulleiki við annuitetslánum, har rentubroytingar ikki ávirka lánsgjaldið, men heldur afturgjaldstíðina, um onnur avtala ikki verður gjørd.

## 8.4 Prísgongdin fyri ognaríbúðir

Broytingin í rentugjaldingum verður mátað við broytingum í nominellu rentuni fyri tvey tey týdningarmestu sethúsalánini frá tveimum fíggingarstovnum. Eisini verða broytingar í rentustuðlinum roknaðar við.
Tað vil siga, at prístalið fyri ognaríbúðir verður roknað eftir broytingum í rentugjaldingunum frameftir fyri restskuld av íbúðalánum, sum vóru galdandi í 2000.
At prísbroytingin á íbúðarlánum, er sett at vera rentubroytingin netto, t.e. íroknað broytingina í rentustuðulinum, meðan vektin fyri íbúðarnýtslu er sett at vera rentugjaldingin brutto, t.e. uttan rentustuðul, er ikki sambæriligt. Hetta verður eisini tikið uppaftur, tá brúkaraprístalið verður endurskoðað um fá ár. Ætlanin framyvir er, at tað í mesta lagi verða fimm ár ímillum hvørja endurskoðan av øllum brúkaraprístalinum.

# Skjal 1 Útrokning av miðalprísum, grundbólkaprístali og brúkaraprístali

**<u>Útrokning av grundbólkaprísi</u>**

*$p_t$: miðalprísur í handilsbólki, k: tal á handlum, $h_t$: prísur í handli*

$$p_t = \prod_{i=1}^{k} \left(h_t^i\right)^{\frac{1}{k}} = \sqrt[k]{h_t^1 \cdot h_t^2 \cdot \ldots \cdot h_t^k}$$

*$P_t$: eindarprísur, n: tal á handilsbólkum, $v^i$: handilsbólkavekt í bólki i.*

$$P_t = \prod_{i=1}^{n} \left(p_t^i\right)^{v^i} = \left(p_t^1\right)^{v^1} \cdot \left(p_t^2\right)^{v^2} \cdot \ldots \cdot \left(p_t^n\right)^{v^n}$$

*$\overline{P}_t$ : grundbólkaprísur, m :tal á eindum, $w^i$ :eindarvekt fyri eindina i*

$$\overline{P}_t = \prod_{i}^{m} \left(P_t^i\right)^{w^i} = \left(P_t^1\right)^{w^1} \cdot \left(P_t^2\right)^{w^2} \cdot \ldots \cdot \left(P_t^m\right)^{w^m}$$

**<u>Útrokning av grundbólkaprístali</u>**

$$I_{t:0}^i = \frac{\overline{P}_t^i}{\overline{P}_0^i} = \frac{\overline{P}_1^i}{\overline{P}_0^i} \cdot \frac{\overline{P}_2^i}{\overline{P}_1^i} \cdots \frac{\overline{P}_{t-1}^i}{\overline{P}_{t-2}^i} \cdot \frac{\overline{P}_t^i}{\overline{P}_{t-1}^i}$$

Grundbólkaprístal tíðarskeið *t* kann roknast beinleiðis ella sum samanbundið prístal við at falda prístølini hvørt tíðarskeið saman.

| | Jan | Apr | Juli | Okt |
|---|---|---|---|---|
| Grundbólkaprístal smb. við tíð frammundan | 100,0 | 102,0 | 102,0 | 105,0 |
| Grundbólkaprístal , januar =100 | 100,0 | 102,0 | 104,0 | 109,2 |

Samanbundið grundbólkaprístal fyri t.d. juli er roknað sum (102,0*102,0)/100 = 104,0. Og fyri oktober (104,0*105,0)/100 = 109,2.

## Útrokning av brúkaraprístalinum

Eftir útrokning av grundbólkaprístølum verður brúkaraprístalið roknað sum vektað aritmetiskt miðal av øllum grundbólkaprístølum:

$$I_{t:0} = \Sigma w_0^i \cdot I_{t:0}^i \qquad \Sigma w_0^i = 1$$

$I_{t:0}^i$ : Grundbólkaprístal fyri grundbólk $i$ tíð $t$ smb. við prístalsgrundtíðarskeið 0 (1.*apríl* 2001)

Hetta merkir, at brúkaraprístalið - og øll bólkaprístøl - oman fyri grundbólkaprístal verða roknað sum prístal av Laspeyres-slagnum (1):

$W_0^i$ : *Lutfalsligi útreiðsluparturin hjá grundbólki* (*í* 1998)

Laspeyres-prístalið er eitt prístal við føstum vektum, sum eru nøgdirnar í vektargrund-tíðarskeiðnum. Roknað verður lutfallið millum at keypa nøgdirnar grundárið 0 fyri prísir ávikavist ár t og grundár 0. T.e. at útreiðslurnar at keypa somu nøgd verða samanbornar.

$$I_{t:0} = \frac{\sum P_t^i \cdot Q_0^i}{\sum P_0^i \cdot Q_0^i}$$

Nýggja prístalið er ikki eitt reint Laspeyres prístal, tí so skulu øll trý grundtíðarskeiðini falla saman. T.e.

- Vektargrundtíðarskeið
- Prísgrundtíðarskeið
- Indexgrundtíðarskeið

skal vera eitt og sama tíðarskeið. Men vektargrundtíðarskeiðið í nýggja brúkaraprístalinum er 1998, meðan prís- og indexgrundtíðarskeiðið er fyrsta tíðarskeiðið, ið prísir verða heintaðir inn fyri (1.apríl 2001)

(1) Laspeyres formilin omanfyri kann ikki nýtast beinleiðis, tí upplýsingar eru ikki um nøgdirnar, sum nýttar eru, bert um útreiðslurnar. Men formilin kann umskrivast, so prístalið verður ein funksjón av lutfalsligu útreiðslupørtunum hjá grundbólkunum, t.e. vektunum:

$$I_{t:0} = \frac{\sum P_t^i \cdot Q_0^i}{\sum P_0^i \cdot Q_0^i} = \frac{P_0^i \cdot Q_0^i}{\sum P_0^i \cdot Q_0^i} \cdot \sum \frac{P_t^i}{P_0^i} = \sum W_0^i \cdot \frac{P_t^i}{P_0^i} = \sum W_0^i \cdot I_{t:0}^i$$

## Skjal 2 Spurnakanning um býlisútreiðslur

Vegna stóru trupulleikarnar við uppgerðini av nýtsluni av egnari íbúð og vantandi skrásetingum av leigumarknaðinum, bæði viðvíkjandi lutfalsliga partinum av húskjum, sum búgva til leigu, og av leigurprísinum, var spurnakanning gjørd fyri býlisútreiðslur í februar 2001.

Endamál:

- At kanna leigumarknaðin, hvussu stórur partur av føroysku húskjunum búgva til leigu, og hvussu stór leiguútreiðslan er samanlagt til vektina fyri leigu.
- At kanna leiguvirðið á leiguíbúðum.
- At kanna eigaragjøld hjá ognaríbúðum, býtt eftir rentugjøldum og avdráttum.
- At sammeta upplýsingar um rentuútreiðslur frá almenna rentustuðlinum við rentuútreiðslur upplýstar av húsarhaldunum sjálvum.
- At kanna samansetingina av húskjum, tal á vaksnum og børnum.

**Stakroyndin**

Gott 1000 tilvildarliga húski vóru vald út, og fekst svar frá 906. Úrvalið varð gjørt eftir telefonbókini, soleiðis at 15 hvørt nummar varð valt. Var nummarið ein fyritøka, stovnur, felag e.l., so var eftir fastari mannagongd annað nummar valt. Svaraði húskið ikki, varð ringt aftur dagin eftir. Upplýsingarnar frá húskjunum vórðu lagdar inn í telduskipan samstundis, sum spurt var. Eftir telefonnummari bar til at skilja millum upplýsingar um íbúðir í Havn og á bygd.

**Evni í spurnakanningini**

| Upplýsing | Spurningur | Viðmerking |
|---|---|---|
| Persónsupplýsingar | Aldur og kyn | Tann spurdi eldri enn 17 ár |
| Samanseting av húski | Vaksnin og børn í tali | Børn: Heimabúgvandi eldri enn 17 ár |
| Slag av íbúð | Ognaríbúð, leiguíbúð ella kamarsleiga | |
| Stødd á íbúð | | Fermetrar innrættaðir til íbúðaendamál |
| Útreiðslur fyri leigu | Húsaleiga um mánaðin | v/el og hita ella v/hita ella u/el og hita |
| Útreiðslur fyri ognaríbúð | Rentuútreiðslur og avdráttur, hvør sær ella samanlagt, um mánaðin ella um árið | |
| Søluvirði á ognaríbúð | Eigarans meting av søluvirði í dag | |

# Skjal 3 Úrslit av húsarhaldskanningini

## Húsarhaldsnýtsla eftir høvuðbólkum, samanlagt og fyri miðalhúski. 1998

| Coicop-nr. | Høvuðsbólkar | Samanlagt | Meðalhúski | Lutfall |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Matur og drekka | 687.086.413 | 48.482 | 21,3 |
| 02 | Rúsdrekka og tubbak | 191.064.834 | 13.482 | 5,9 |
| 03 | Klædnavørur og fótbúnaður | 175.428.133 | 12.379 | 5,4 |
| 04 | Býli | 652.715.454 | 46.057 | 20,2 |
| 05 | Innbúgv, húsbúnaður o.l. | 193.251.917 | 13.636 | 6,0 |
| 06 | Heilsa | 89.730.357 | 6.332 | 2,8 |
| 07 | Flutningur | 423.080.175 | 29.853 | 13,1 |
| 08 | Samskifti | 147.704.884 | 10.422 | 4,6 |
| 09 | Frítíð og mentan | 384.359.284 | 27.121 | 11,9 |
| 10 | Útbúgving | 1.700.000 | 120 | 0,1 |
| 11 | Hotell og matveitara | 115.128.192 | 8.124 | 3,6 |
| 12 | Ymiskar vørur og tænastur | 171.201.011 | 12.080 | 5,3 |
| | **Samanlagt** | **3.232.450.653** | **228.087** | **100,0** |

## Húsarhaldsnýtslan eftir vørubólkum 1998

| Coicop-nr. | Vørubólkar | Krónur | Lutfall |
|---|---|---|---|
| **01** | **Matur og drekka** | **687.086.413** | **21,3** |
| 01.1 | Matur | 611.776.577 | 18,9 |
| 01.1.1 | Breyð og kornvørur | 117.158.349 | 3,6 |
| 01.1.2 | Kjøt | 121.064.164 | 3,7 |
| 01.1.3 | Fiskur | 35.400.892 | 1,1 |
| 01.1.4 | Mjólk, ostur og egg | 98.553.753 | 3,0 |
| 01.1.5 | Oljur og fitievni | 10.180.420 | 0,3 |
| 01.1.6 | Frukt | 31.669.873 | 1,0 |
| 01.1.7 | Grønmeti, epli o.l. | 53.078.885 | 1,6 |
| 01.1.8 | Sukur, sjokuláta, góðgæti o.l | 93.048.695 | 2,9 |
| 01.1.9 | Aðrar matvørur | 51.621.547 | 1,6 |
| 01.2 | Drekka | 75.309.836 | 2,3 |
| 01.2.1 | Kaffi, te og kakao | 22.490.758 | 0,7 |
| 01.2.2 | Sodavatn, saft og vatn | 52.819.078 | 1,6 |
| **02** | **Rúsdrekka og tubbak** | **191.064.834** | **5,9** |
| 02.1 | Rúsdrekka | 121.680.204 | 3,8 |
| 02.2 | Tubbak | 69.384.631 | 2,1 |
| **03** | **Klædnavørur og fótbúnaður** | **175.428.133** | **5,4** |
| 03.1. | Klædnavørur | 147.516.758 | 4,6 |
| 03.2 | Fótbúnaður | 27.911.375 | 0,9 |
| **04** | **Býli** | **652.715.454** | **20,2** |
| 04.1 | Húsaleiga | 60.335.510 | 1,9 |
| 04.2 | Sethús, rentuútreiðslur | 254.993.750 | 7,9 |
| 04.3 | Viðlíkahald av bústaði | 89.138.675 | 2,8 |
| 04.5 | Ravmagn og hiti | 248.247.519 | 7,7 |

## Húsarhaldsnýtslan eftir vørubólkum 1998, framhald

| Coicop-nr. | Vørubólkar | Krónur | Lutfall |
|---|---|---|---|
| **05** | **Innbúgv, húsbúnaður o.l.** | **193.251.917** | **6,0** |
| 05.1 | Innbúgv, húsbúnaður | 77.364.064 | 2,4 |
| 05.2 | Vevnaður til húsarhald | 21.067.332 | 0,7 |
| 05.3 | Húsarhaldstól | 26.355.638 | 0,8 |
| 05.4 | Borðbúnaður, gløs og búnyttur | 21.295.459 | 0,7 |
| 05.5 | Amboð og útgerð til hús og urtagarð | 17.311.976 | 0,5 |
| 05.6 | Ymiskar húshaldsvørur | 29.857.449 | 0,9 |
| **06** | **Heilsa** | **89.730.357** | **2,8** |
| 06.1 | Heilsa og heilsuvørur | 55.254.276 | 1,7 |
| 06.2 | Heilsutænastur | 34.476.081 | 1,1 |
| **07** | **Flutningur** | **423.080.175** | **13,1** |
| 07.1 | Akfarskeyp | 165.659.554 | 5,1 |
| 07.2 | Rakstur av akførum | 202.797.774 | 6,3 |
| 07.3 | Flutningur | 54.622.847 | 1,7 |
| **08** | **Samskifti** | **147.704.884** | **4,6** |
| 08.1 | Postur | 9.177.260 | 0,3 |
| 08.2 | Teleútgerð | 7.343.433 | 0,2 |
| 08.3 | Teletænastur | 131.184.191 | 4,1 |
| **09** | **Frítíð og mentan** | **384.359.284** | **11,9** |
| 09.1 | Sjónvarp, myndatól, KT-útgerð o.l. | 84.703.705 | 2,6 |
| 09.2 | Bátapláss | 1.454.450 | 0,0 |
| 09.3 | Frítíðarvørur, leiku o.l. | 42.055.625 | 1,3 |
| 09.4 | Mentan, ítróttur og peningaspæl | 69.132.636 | 2,1 |
| 09.5 | Bløð. bøkur og skrivitól | 108.636.328 | 3,4 |
| 09.6 | Frítíðarferð uttanlands | 78.376.539 | 2,4 |
| **10** | **Útbúgving** | **1.700.000** | **0,1** |
| 10.1 | Fólkaskúlin | 700.000 | 0,0 |
| 10.5 | Aðrir skúlar | 1.000.000 | 0,0 |
| **11** | **Hotell og matveitarar** | **115.128.192** | **3,6** |
| 11.1 | Veitingar | 96.105.329 | 3,0 |
| 11.2 | Gisting | 19.022.863 | 0,6 |
| **12** | **Ymiskar vørur og tænastur** | **171.201.011** | **5,3** |
| 12.1 | Sjálvsrøkt | 78.757.465 | 2,4 |
| 12.3 | Persónligir lutir | 10.878.306 | 0,3 |
| 12.4 | Samfelagsligar tænastur | 33.953.936 | 1,1 |
| 12.5 | Tryggingar | 38.708.042 | 1,2 |
| 12.6 | Fíggjartænastur | 6.891.520 | 0,2 |
| 12.7 | Aðrar tænastur | 2.011.742 | 0,1 |
| | **Samanlagt** | **3.232.450.653** | **100,0** |

**Nýggja vektargrundarlagið samanborið við húsarhaldskanning 1972 og við vektargrundar-lagið í Íslandi og Danmark**

| Coicop-nr. | Høvuðsbólkar | Føroyar 1972 | Føroyar 1998 | Ísland 2000 | Danmark 1996 |
|---|---|---|---|---|---|
| 01 | Matur og drekka | 42,1 | 21,3 | 17,2 | 15,1 |
| 02 | Rúsdrekka og tubbak | 5,6 | 5,9 | 3,2 | 6,0 |
| 03 | Klædnavørur og fótbúnaður | 10,2 | 5,4 | 5,3 | 5,4 |
| 04 | Býli | 21,5 | 20,2 | 19,1 | 27,7 |
| 05 | Innbúgv, húsbúnaður o.l. | 8,2 | 6,0 | 5,3 | 6,0 |
| 06 | Heilsa | 1,6 | 2,8 | 3,1 | 2,0 |
| 07 | Flutningur | 3,2 | 13,1 | 19,3 | 15,7 |
| 08 | Samskifti | 1,0 | 4,6 | 2,6 | 2,1 |
| 09 | Frítíð og mentan | 1,9 | 11,9 | 12,2 | 7,7 |
| 10 | Útbúgving | - | 0,1 | 1,0 | 0,9 |
| 11 | Hotell og matveitara | - | 3,6 | 5,3 | 5,8 |
| 12 | Ymiskar vørur og tænastur | 4,7 | 5,3 | 6,4 | 6,4 |

## Húsarhaldsnýtslan hjá miðalhúski 1998

| Coicop-nr. | Vørubólkar | Miðalhúski |
|---|---|---|
| 01.1 | Matur | 43.168 |
| 01.2 | Drekka | 5.314 |
| 02.1 | Rúsdrekka | 8.586 |
| 02.2 | Tubbak | 4.896 |
| 03.1. | Klædnavørur | 10.409 |
| 03.2 | Fótbúnaður | 1.969 |
| 04.1 | Goldin húsaleiga, leigara | 4.257 |
| 04.2 | Sethús, rentuútreiðslur | 17.993 |
| 04.3 | Viðlíkahald av bústaði | 6.290 |
| 04.5 | Ravmagn og hiti | 17.517 |
| 05.1 | Innbúgv, húsbúnaður | 5.459 |
| 05.2 | Vevnaður til húsarhald | 1.487 |
| 05.3 | Húsarhaldstól | 1.860 |
| 05.4 | Borðbúnaður, gløs og búnyttur | 1.503 |
| 05.5 | Amboð og útgerð til hús og og urtagarð | 1.222 |
| 05.6 | Ymiskar húshaldsvørur | 2.107 |
| 06.1 | Heilsuvørur | 3.899 |
| 06.2 | Heilsutænastur | 2.433 |
| 07.1 | Akfarskeyp | 11.689 |
| 07.2 | Rakstur av akførum | 14.310 |
| 07.3 | Flutningur | 3.854 |
| 08.1 | Postur | 648 |
| 08.2 | Teleútgerð | 518 |
| 08.3 | Teletænastur | 9.257 |
| 09.1 | Sjónvarp, myndatól, KT-útgerð o.l. | 5.977 |
| 09.2 | Bátapláss | 103 |
| 09.3 | Aðrar vørur og útgerð | 2.968 |
| 09.4 | Frítíðar- og mentanartænastur | 4.878 |
| 09.5 | Bløð, bøkur og skrivitilfar | 7.666 |
| 09.6 | Frítíðarferð uttanlands | 5.530 |
| 10.1 | Fólkaskúlin | 49 |
| 10.5 | Aðrir skúlar | 71 |
| 11.1 | Veitingar | 6.781 |
| 11.2 | Gisting | 1.342 |
| 12.1 | Persónlig røkt | 5.557 |
| 12.3 | Persónligir lutir | 768 |
| 12.4 | Samfelagsligar tænastur | 2.396 |
| 12.5 | Tryggingar | 2.731 |
| 12.6 | Fíggjartænastur | 486 |
| 12.7 | Aðrar tænastur | 142 |
| | **Samanlagt** | **228.087** |

## Keldur til kanningar av føroyskari framleiðslu

**Vøruframleiðsla**
Føroyskar fyritøkur, roknskapir, mvg-søla, heilsølur og stórhandlar, Árbók fyri Føroyar 2000

**Vanligar tænastur**
Roknskapir, mvg-søla, spurnakanning

**Ferðing og flutningur, privat**
Bornholms Forskningscenter, Árbók fyri Føroyar 2000, ferðafeløg, mvg-søla

**Flutningur, alment**
Strandfaraskip Landsins, Tórshavnar Býráð

**Samskiftistænastur**
Postverk Føroya, Føroya Tele

**Heilsa**
Landsapotekarin

**Frítíðar- og mentanartænastur**
Ítróttarfeløg, Musikkskúlin, Kvøldskúlin, Útvarp og Sjónvarp Føroya, Happadrátturin, Landsdjóralæknin, Árbók fyri Føroyar 2000, Vektargrundarlag fyri íslendska brúkaraprístalið

**Útbúgving, skeið**
Adventistaskúlin, Formula Føroyar

**Tryggingar**
Tryggingarfelagið Føroyar

**Aðrar fíggjartænastur**
Føroya Banki, Norðoya Sparikassi, Føroya Sparikassi

**Samfelagsligar tænastur**
Almannastovan, Árbók fyri Føroyar 2000, kommunuroknskapur 1998, Tórshavnar kommunu

**Aðrar tænastur**
Koyriskúlar, Bileftirlitið, Tinglýsingin, Føroya Landfúti

**Býli**
Íbúðakanning (leigupartur), landskassaroknskapur (rentustuðul til sethúsalán), timburhandlar smb. Ísland og DK (viðlíkahald), SEV, oljufeløg og Fjarhitafelagið (orkuveiting)